FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2017

LØGMANSSKRIVSTOVAN

www.lms.fo

# RØÐA LØGMANS

**Harra formaður**

Einaferð var tað ein maður, sum vaknaði við kaldan dreym.

Hesa náttina droymdi hann ein løgnan dreym um sjey feitar kýr. Vakrar og væl í holdum gingu tær við áarbakkan og ótu tað góða, grøna grasið.

Hesin maðurin var ein Farao – høvdingi í Egyptalandi, og hann átti at kunnað sovið væl, tí tað gekst framúr væl í landinum.

**Harra formaður**

Tað gongst eisini væl í Føroyum.

Vit eru eydnusamasta fólk í heiminum, vísir kanning hjá Fólkaheilsuráðnum. Búskapurin verður skírdur ein "superøkonomi". Vit hava ongantíð áður verið so nógvir íbúgvar. Útlendsk ferðafólk streyma til oyggjarnar. Arbeiðið er til næstan allar hendur. Ítrótturin røkkur dreymaúrslitum. Og fyrsta Michelin-stjørnan er í hús.

Tað skuldi tí ikki verið neyðugt at stúrt, nú okkara kýr – so at siga – njóta tað sevjumikla grøna grasið. Men hjá Farao vóru tað ikki tær feitu kýrnar, sum darvaðu náttarsvøvnin. Tað var tað, hann síðani droymdi.

Tí brádliga komu sjey ljótar, skrámutar kýr og gloyptu teimum vøkru kýrnum.

Tey flestu munnu hava hoyrt hesa søguna um Farao – og um Jósef, sum týddi honum dreymin. Um sjey ár við nógvari yvirflóð – og síðani sjey hungursár.

Dreymatýðingin kom helst dátt við hjá høvdinginum. Eingin vil hugsa um ringar tíðir, tá ið alt stendur í besta blóma. Men tað var júst tað, Farao mátti gera. Hann skuldi leggja til síðis í góðu tíðunum, so hann kundi standa ímóti, tá ringu tíðirnar komu.

**Harra formaður**

Søgan um Farao er framvegis tíðarbær. Eftir góðar tíðir koma ringar tíðir.

Pendulið sveiggjar støðugt, men stýra vit væl, kunnu vit minka um sveiggini og gera ringu tíðirnar betri.

Í Føroyum hava vit tó sjáldan stýrt nóg væl í góðum tíðum. Lagt uppfyri og gjørt neyðugu broytingarnar, áðrenn búskaparliga illveðrið er brostið á aftur.

Í bókini í Havsins hjarta lýsir Gunnar Hoydal okkum soleiðis:

*Dandandi á eggini millum stórlæti og skomm, at vit sveiggja í Føroyum, skifta millum ovurhuga og ráðaloysi, upp- og niðurtúrar.*

Tá ið samgongan tók við, hevði landið havt stórt hall í nógv ár. Tað er nú vent til avlop. Vit hava ikki latið okkum freistað til at oyðsla, nú tað gongst væl. Heldur hava vit víst varsemi. Hildið aftur. Júst sum dreymurin hjá Farao eggjaði til.

Tað krevur dirvi at halda aftur á aldukambinum. Vanliga veksur almenni raksturin við 7 til 8 prosentum árliga í góðum tíðum. Men komandi ár veksur raksturin bara 2,5 prosent samanlagt.

Í Búskapargrunnin bera vit avlopskornið, ið skal styrkja okkum í verri tíðum. Sum vit skulu dúva uppá, tá ið kýrnar aftur verða rakari. Og tá ið vit skulu rinda skuld aftur.

Búskapargrunnurin er eitt av týðandi amboðunum í strembani eftir størri sjálvbjargni. Seinastu tvey árini hava vit harumframt fryst blokkin. Avlopið veksur. Okkara BTÚ veksur. Vit fara at rinda skuld aftur. Og familjurættarliga økið verður yvirtikið á ólavsøku komandi ár, samstundis sum vit arbeiða við at yvirtaka útlendinga- og loftferðsluøkið.

**Harra formaður**

»Út ganga djarvir dreymar«, sigur orðatakið.

Nógvir av djørvu dreymunum hjá samgonguni eru gingnir út. Aðrir eru ávegis. Avrikini eru sjónlig. Onkur løta hevur verið buldraslig, treyðugt so – men eg kann í dag púra ivaleysur staðfesta, at Føroyar eru vorðnar eitt javnari samfelag. Eitt meira tíðarhóskandi samfelag. Og eitt meira sjálvbjargið samfelag.

Júst sum vit droymdu um undan valinum.

Kortini hava vit enn ikki loyst øll stórmálini.

Eg má bara siga, sum er. Tað hevur ikki gingið eftir vild. Men vit falla ikki í fátt.

»Men hví broyta, nú tað gongst so væl?« spyrja fólk.

Tað gera vit, tí tað er stórur munur á at velja at gera broytingar – og at vera kroystur til at gera tær. Tað fyrra er at hava tamarhaldið – tað seinna er at missa tamarhaldið.

Ongantíð áður eru grundleggjandi broytingar gjørdar í góðum tíðum. Og hóast tað ikki er lætt at loysa hesi stóru málini, er tað kortini rætt at gera tað.

Tí venda vit aftur til Farao, so mátti hann eisini gera broytingar í góðu tíðunum.

Summi hava uttan iva verið ósamd og ill um broytingarnar. Men tær vóru avgerandi, um tey skuldu klára seg, tá soltnu kýrnar komu. Tá pendulið sveiggjaði aftur.

Tað eru tær eisini hjá okkum.

Tá Farao framdi sínar broytingar fekk eingin høvi at mótmæla. Tíbetur er hetta ikki soleiðis hjá okkum. Í einum sterkum fólkaræði er pláss fyri fleiri meiningum – eisini fleiri hvassorðaðum meiningum.

Tað er eitt gott tekin, at fólk hava sterkar hugsanir um fiskivinnunýskipanina. Tí tað vísir, at vit brýggja okkum um okkara land og okkara skipanir.

Tilgongdin hevur verið tvørlig, og kjakið hevur verið hart. Men sjónarmið eru førkað, og hugsanir brýndar. Allir partar hava givið seg.

Úrslitið leggja vit fyri Løgtingið í august. Tað byggir á upprunaliga uppskotið, sum Løgtingið viðgjørdi í undanfarnu tingsetu. Onkrar broytingar frá vinnunevndini verða tiknar við. Og gildiskoman fyri kvotaskipanina verður útsett til 1.januar 2019.

Grundarlagið er enn sum áður, at fiskiríkidømið er ogn Føroya fólks. Tað er varandi grundarlag undir føroyska búskapinum og kann hvørki í lóg ella í verki gerast privat ogn.

Nógvar undanfarnar samgongur hava sagt, at ein nýggj fiskivinnuskipan taldist millum fremstu og týdningarmestu málini. Nógvar royndir eru gjørdar. Nógv uppskot eru havnað.

Nú má og skal málið loysast!

Nú fiskivinnuskipanin er við at koma undir land, skulu eisini karmarnir um alivinnuna dagførast. Alivinnan er eftir fáum árum vorðin okkara fremsta útflutningsvinna.

Vit vilja tryggja, at alivinnan ikki bara lønar seg her og nú, men eisini í framtíðini. Tí taka vit lívfrøðiligu avbjóðingarnar í álvara og hava hert eftirlitið.

Tað eru bara tríggjar fyritøkur, sum í dag hava rætt til at ala fisk. Okkara uppskot leggur upp til, at miðsavnanin ikki gerst enn sterkari.

Vinnan skal hava betri møguleikar at mennast, til dømis við aling á landi ella á harðbalnum sjóøkjum – og við at ala skeljadjór og tara.

Tað hevur verið drúgt at fyrireika nýggju pensjónsskipanina. Men tað hevur verið neyðugt.

Nýggja pensjónsskipanin fer at lyfta fátækastu pensjónistarnar upp. Tað hava tey uppiborið afturfyri alt, tey hava latið okkum ígjøgnum sítt langa arbeiðslív.

Karmarnir um ellisárini verða betri. Og sjálvandi fara tey, sum hava hug og møguleika at arbeiða eftir pensjónsaldur, at sleppa tað. Eru fólk hinvegin niðurslitin fyri pensjónsaldur, kunnu tey pensjónerast tá.

Pensjónsskipanin verður løgd fyri Løgtingið í heyst. Ein skipan, har fólk sjálvi spara saman, samstundis sum hon verður gjørd meira samhaldsføst.

Undan okkum hava fleiri roynt at loyst gordiska knútin við teimum trimum sjúkrahúsunum. Men við heilsunýskipanini hava vit kvett knútin av.

Frá 1. januar verður sjúkrahúsverkið skipað sum ein bygnaður. Ein leiðari fer at hava evstu ábyrgdina saman við teimum trimum staðbundnu leiðslunum. Uppgávubýtið millum sjúkrahúsini skal vera greitt, og tey skulu hava felags visitatión og bíðilista. Vit skulu nú gera av, hvørjar viðgerðir og tænastur skulu vera og – ikki minst – hvar tær skulu vera.

Fyri at fáa læknar og heilsustarvsfólk at støðast stovnaðu vit eina serstaka serlæknapulju. Og longu nú síggja vit úrslit. Seinasta árið eru fleiri nýggir serlæknar settir í starv. Tá hetta árið er liðið eru á leið 10 serlæknar fleiri í starvi í sjúkrahúsverkinum.

Eisini stjórnarskipanin, sum vit skjótt skulu á fólkaatkvøðu um, verður eitt nýbrot. Í hesi løtu verður hon send til hoyringar, so allir føroyingar sleppa at siga sína hugsan.

Stjórnarskipanin tryggjar okkum nøkur grundleggjandi rættindi, sum vit kanska hava tikið fyri givið. Eitt nú javnbjóðis rættindi til undirvísing og ókeypis fólkaskúla. Stjórnarskipanin slær eisini fast, at børn hava rætt til at vaksa upp undir tryggum og góðum korum – og at øll í hinum endanum hava rætt til virðilig ellisár.

Stjórnarskipanin er ikki eitt samgongumál. Hon er eitt mál fyri alt Løgtingið og eitt mál fyri alt Føroya fólk. Við stjórnarskipanini verður okkara fólkaræðið styrkt, tí vit staðfesta, at Føroya fólk hevur valdið í Føroyum. Ikki Løgtingið – ikki landsstýrið, men fólkið. Skal avgerð takast um grundleggjandi spurningar – til dømis um ríkisrættarliga støðan skal broytast ella um vit skulu gerast partur av ES – er tað eingin annar enn fólkið, sum á fólkaatkvøðu kann taka avgerðina.

Mentanin er ein høvuðsorsøk til, at vit búgva júst her. Mentanin er sterkasta megin, ið heldur okkum saman, hóast vit eru ósamd.

Samgongan vil, at okkara listafólk skulu hava betri kor at hugsavna seg um sína list. Tí er stuðulin hækkaður bæði til Mentanargrunnin og til film.

Ein minstulønarskipan fyri yrkislistafólk undir Mentanargrunninum fer at tryggja arbeiðsnáðir í longri tíðarbil – nakað, sum listafólk leingi hava droymt um.

Og eisini aðrir mentanardreymar gerast veruleiki, tí loksins fer leiklistin at fáa ein virðiligan pall. Fyrstu ítøkiligu stigini til tjóðpallin verða tikin seinni í ár.

**Harra formaður**

Í løtuni eru føroysku kýrnar óvanliga feitar. Vit hava sanniliga nógv at takka fyri.

Og góðu tíðirnar koma føroyingum til góðar. Síðani vit tóku við, hava vit minkað um skattin hjá lág- og miðalløntum. Vit hava hækkað barnafrádráttin, lestrarlønina og latið familjuískoyti.

Bøttu korini hava verið við til at draga fólk heim og at fáa fólk at støðast – júst sum vit ætlaðu.

Ongantíð áður hava tað búð so nógv fólk í Føroyum.

Men tað hevur givið eina nýggja avbjóðing.

Herfyri hoyrdu vit fleiri mammur kæra sína búðstaðarneyð í miðlunum.
–Her er eingin hjálp at heinta nakrastaðni, segði ein teirra.
–Eg kenni meg sum eina plágu, segði ein onnur.
–Børnini hava betri uppiborið, segði ein triðja.

Summi kalla bústaðarneyðina fyri ein luksustrupulleika. Men ein mamma greiddi frá, hvussu hon eitt skifti mátti búgva í bilinum við børnunum. Her. Í Føroyum. Tað er eingin luksusstøða.

Trýsti bústaðarmarknaðurin er helst okkara størsta avbjóðing í løtuni.

Serliga tørvar okkum leigubústaðir við rímiligum kostnaði, lestrarbústaðir og vardar bústaðir.

Og samgongan er farin undir hetta.

Vit hava givið Bústøðum greið boð um at raðfesta, har tørvurin er størstur. Bústaðir hava eisini fingið fígging til at byggja 200 leigubústaðir afturat teimum verkætlanum, ið longu eru í gongd. Gongst sum ætlað fer Bústaðir at hava umleið 500 leigubústaðir í 2019.

Men tað loysir bert ein part av avbjóðingini. Tí mugu øll arbeiða saman. Í løtuni verður eisini arbeitt við einari ítøkiligari loysn um at byggja nógvar bíligar bústaðir beinanvegin.

Og so havi eg eina áheitan á føroysku peningastovnarnar. Latið vera við at trýsta sethúsaprísirnar upp. Søgan eigur at fáa tykkum at ræðast.

Ein annar bólkur av føroyingum, sum í mong ár hevur droymt um betri bústaðir, eru okkara veikastu samborgarar.

Hesin dreymurin skal eisini gerast veruleiki.

Tí hevur landsstýrið sett 200 milliónir av til bústovnar og vardar bústaðir. Hetta er ein søguliga stór játtan – kanska tann største, einstaka bústaðarraðfestingin á sosiala økinum nakrantíð. Komandi árini byggja vit íbúðir til fólk við menningartarni, sálarsjúku og seinheilaskaða, umframt nýggjan bú- og viðgerðarstovn til børn og ung við autismu – og eitt spildurnýtt barnaheim.

Ein bólkur, sum somuleiðis hevur droymt um betri kor, eru fyritíðarpensjónistarnir. Teirra tilverugrundarlag hevur í áravís verið ov vánaligt. Tað ger samgongan eisini nakað við. Miðað verður eftir, at fyritíðarpensjónistar fáa eina skattaminking í hesum tingárinum.

**Harra formaður**

Tá ið eg sum smádrongur sat í skúlastovuni á Ósaskúlanum í Klaksvík, lærdi eg um dreymin hjá Farao. Men hugtakandi søgan endar hvørki við dreyminum ella týðingini av honum.

Tí so skjótt, sum Jósef hevði greinað dreymin, fór Farao til verka. Hann bygdi stórar goymslubygningar og fór undir at savna saman.

Og tá tey sjey rakárini komu, streymaðu fólk úr øllum herðashornum at keypa – uttan mun til, hvat tey høvdu latið inn í góðu tíðunum.

Aftur kunnu vit spyrja, hvussu vorðið er í Føroyum.

Vit síggja, at ikki øll øki í landinum fáa eins stóran lut í framgongdini. Í miðstaðarøkinum økist fólkatalið dagliga, meðan onnur øki ongan fólkavøkstur hava.

Fyri at loysa hetta má samferðslukervið vera gott og álítandi. Tað skapar møguleikar at búgva einastaðni í landinum og arbeiða aðra staðni.

Nøkur stig eru longu tikin. Eysturoyar- og Sandoyartunnilin, umframt smærru tunlarnir kring landið, verða nú gjørdir.

Men tess betri samferðslukervið verður, tess meiri noyðast vit at finna eina samhaldsfasta og tíðarhóskandi gjaldsskipan fyri allar Føroyar.

Men eisini í aðrar mátar vilja vit býta javnari. Sjóvinnustýrið fær nýtt høvuðssæti í Vágum, í Vestmanna verður ferðavinnuútbúgving stovnað, á Sandoynni listaútbúgving, ítróttaháskúli og eftirskúli í Suðuroy. Vit útbyggja miðnám á Kambsdali, og í Klaksvík byggja vit nýggjan húsarhaldsskúla.

Eisini heilsan hjá føroyingum skal raðfestast kring alt landið. Vit arbeiða við, at øll fáa fleiri heilsutænastur heima í nærumhvørvinum. Landið verður skipað í sterk heilsuøki við heilsudeplum, sum veita fjølbroyttar tænastur.

Nýggja skipanin krevur bæði fleiri starvsfólk – til dømis kommunulæknar og at sjúkrarøktar-frøðingarnir kunnu eftirútbúgva seg. Kommunulæknaskipanin hevur haltað seinastu árini, men trý átøk fara at bøta um støðuna.

Vit hava sett tríggjar kommunulæknar í fast starv.
Vit hava hækkað játtanina til kommunulækna-serútbúgvingina.
Og vit ætla at hækka samlaða talið av kommunulæknum kring landið.

Á Klaksvíkar sjúkrahúsið knýta vit staðbundnu tilbúgvingina saman við kommunulæknavaktini á Landssjúkrahúsinum. Soleiðis sleppa borgarar í norðureysturøkinum undan at koyra langar teinar til kommunulækna eins ofta.

Á Suðuroyar sjúkrahúsið er serlæknatilbúgvingin raðfest hægri, nú tilboðið um pínuviðgerð verður bjóðað.

Eisini tey, sum stríðast við sálarsjúku, skulu fáa eina dygdargóða viðgerð, so tætt at gerandislívinum sum gjørligt. Tí hava vit tikið stig til at skipa økispsykiatri um alt landið.

Meginreglan skal vera, at børn ikki skulu ferðast longur enn ein hálvan tíma til sernámsfrøðiligt skúla-tilboð. Serstovur eru tí settar á stovn í Suðuroynni, Havn, Vágum, Eysturoynni og Norðoyggjum, so til ber at gagnnýta stuðulstímarnar betur.

**Harra formaður**

Í bókini Tornið á heimsins enda skrivar William Heinesen soleiðis:

*– »Ja, dreymar eru mangan býttisligir« (..) Hetta var vanliga svarið, tú altíð fekk frá teimum vaksnu, tá tú segði teimum frá tínum dreymum. Hetta fekk teg at kenna teg býttisligan, so tú tagdi heldur við tí, tú hevði droymt.*

At vit lurta eftir dreymunum hjá okkara ungu, er fortreytin fyri, at tey halda á at droyma stórt. Tað er aftur fortreytin fyri, at tey seinni avrika nakað stórt.

Leingi hava føroysk ung droymt um at lesa her heima. Nú fáa fleiri møguleikan.

Fleiri pláss eru útvegað til sjúkrarøktarfrøði, og á Vinnuháskúlanum er aspirantskipanin víðkað til eisini at fevna um maskinmeistarar. Í næstum verður ein bachelor yvirbygnaður boðin út til maskinmeistarar og skipsførarar við einum slóðbrótandi samstarvi millum Vinnuháskúlan og Setrið.

Risastóra byggjaríið í Marknagili, Glasir, hevur havt sínar avbjóðingar, men arbeiðið gongur framá, og komandi ár fara ung lesandi at blása lív í stásiligu hølini.

Eisini fíggjarliga royna vit at lurta eftir dreymunum hjá teimum ungu. Tí hækkaði lestrarlønin í ár við 500 krónum um mánaðin fyri hægri lestur, umframt at einsamallir uppihaldarar fáa lestrarløn hvønn mánað í árinum. Næsta stigið verður, at øll undir hægri útbúgving fáa lestrarløn allar 12 mánaðirnar.

Men summi ung tykjast vera fangað í eini marru. Tey droyma um at fóta sær og koma aftur á beint. Rúsdrekka- og rúsevnamisnýtsla er gerandisdagur fyri alsamt fleiri av okkara ungu. Men higartil hava tey undir 18 ikki fingið viðgerð í Føroyum.

Í 2017 er peningur játtaður til tvey viðgerðartilboð til ung: annað er stovnurin »Frælsi« á Eiði, og hitt er Blákrossheimið, sum fer at veita ungum eitt ambulant tilboð.

Mangan eru tað tó samansettir trupulleikar, sum elva til misnýtsluna. Tí verður eitt breitt viðgerðartilboð eisini skipað til ung undir 18.

Í næstum verður aðalorðaskifti um rúsdrekka- og rúsevnapolitikk, og hvussu vit tryggja dygdargóð viðgerðartilboð til øll, sum hava viðgerð fyri neyðini.

## Harra formaður

Tá ið brøður Jósefs í hungurstíðunum komu at biðja um korn úr goymsluni hjá Farao, vórðu teir ikki sendir burtur aftur tómhentir, hóast teir komu úr einum øðrum landi. Nei, teir fingu eisini burturav.

Á sama hátt eiga vit eisini at hjálpa neyðstøddum úti í heimi. Játtanin til menningarhjálp og neyðhjálp hevur leingi verið ov lág, men landsstýrið hevur nú fleirfaldað játtanina.

Tað gongur ikki allastaðni eins væl og hjá okkum. Tað forpliktar. Lata vit burturav, kunnu vit hjápa til at tryggja sosial framstig og búskaparvøkstur í menningarlondum. Vit kunnu veita hjálp, ið munar,

tá ið hungursneyð og vanlukkur raka. Tað gjørdu vit herfyri, tá ið vit lótu tvær milliónir til okkara brøðratjóð Grønland, ið varð hart rakt av ógvisligari flóðaldu.

Men vit arbeiða eisini á øðrum pallum. Sameindu tjóðir hava sett sær fyri at loysa 17 íøkiligar heimstrupulleikar. Fleiri av hesum málunum eru longu partur av føroyskum málsetningum, eitt nú innan menningarsamstarv, orkumenning og javnstøðu.

COP21, veðurlagssáttmálin, ið vanliga verður róptur Paríssáttmálin, boðar frá hugburðsbroyting í veðurlagspolitikki. Vit standa saman við restini av heiminum, og tí fær Paríssáttmálin eisini gildi fyri Føroyar. So skjótt orkupolitikkurin er orðaður, fara vit undir at dagføra veðurlagspolitikkin.

Og ferð er nú komin á grøna orkuskiftið. Tað er fíggjarliga lættari hjá vanligum húskjum at velja grønar orkuloysir, og at keypa akfør, ið koyra við varandi orkukeldum.

Vit smíða í løtuni eina nýggja náttúruverndarlóg, og fyrisitingin av umhvørvismálum, náttúruvernd og kemikaliuøkinum skal skipast betri, eins og tilbúgvingin í mun til dálking á landi og sjógvi skal styrkjast.

Men hóast vit eru fyrivarin heldur enn eftirsnarin, hava vit ikki tamarhald á øllum.

At bretar atkvøddu seg úr ES kann fáa stóra ávirkan á føroyska handils- og fiskivinnu. Spurningarnir eru nógvir, men landsstýrið vil verja og fremja okkara áhugamál. Og eisini vit hava týdning fyri Bretland. Tað ber vitjanin hjá bretska ráðharranum í fiskivinnu- og matvørumálum beint eftir ólavsøku boð um.

**Harra formaður**

Vit vita, at tíðirnar skifta. Eftir sjey feit ár koma sjey rak ár. Tí er neyðugt at hava aðrar berandi súlur, tá ið tonsatal og heimsprísir aftur lækka.

Stóri dreymurin hjá Visit Faroe Islands um at røkka einum umsetningi á 1 milliard krónur í 2020 er um at ganga út.

Men eisini innan ferðavinnuna ræður um at smíða og tillaga skipanir, áðrenn vit av neyð verða kroyst til at gera tað. Ymsar avbjóðingar mugu loysast beinanvegin, skal ferðavinnan verða burðardygg, og náttúra og djóralív ikki líða.

Ein deild, sum skal skipa ferðavinnuna betri, verður stovnað undir Visit Faroe Islands, sum higartil bert hevur marknaðarført Føroyar uttanlands.

Men ferðafólkini, sum koma hendaveg, mugu leggja meiri pening eftir seg. Til dømis áttu tey at rindað meiri fyri at nýta samferðslukervið. Hetta hevur skund at skipa betur.

Ein onnur súla, ið kann styðja undir samfelagið, er um vit megna at menna Føroyar sum maritiman tænastudepil og shippingland. Maritima tænastuvinnan kann vaksa enn meira, um fyritøkur arbeiða saman – og við eini meira miðvísari marknaðarføring. Aftur her vantar ein yvirskipað ætlan, sum fevnir um allar tættir í sjóvinnuni, so sum lógarkarmar, FAS, tænastur og útbúgvingar. Tilmælið um sjóvinnu er latið landsstýrinum, og nú verða tilmælini sett í verk.

Vinnutøknin mennist við rúkandi ferð, og alsamt fleiri størv verða automatiserað. Tað hevur við sær, at tørvurin á førleikum broytist. Tí vil samgongan tryggja, at tey, hvørs arbeiðsuppgávur verða automatiseraðar, verða umskúlað til aðrar uppgávur.

Arbeiðið við at seta vaksnamannaútbúgving á stovn gongur væl. Tað skal verða skjótt hjá vaksnum at eftirútbúgva og førleikamenna seg.

Felags fyri alla okkara vinnu er, at hon má hava eina tíðarhóskandi lóggávu. Fleiri stig eru tikin til hetta. Til dømis fáa smáir matframleiðarar nú høvi at selja handlum og matstovum sínar vørur. Í sama viðfangi hava vit gjørt tað einfaldari at umsita og hava eftirlit við matstovuvinnuni.

**Harra formaður**

Vit fara nú undir nýggja tingsetu, og teinurin hjá samgonguni er skjótt hálvgingin. Mong hava fetini verið, og vit eru komin væl fram á leið.

Undan hesi tingsetuni droymdu vit um einar javnari Føroyar. Um einar meiri tíðarhóskandi Føroyar. Vit droymdu um at taka nøkur fet á sjálvbjargniskós. Og vit droymdu um at loysa fleiri stór mál.

Nú gerast dreymarnir til veruleika.

Men vit røkka ongum málum við sundurlyndi, sjálvsøkni og smáhugsan. Við ynskjum um fyrimunir fyri meg og mín bólk, mína egnu stremban eftir valdi ella flokspolitiskum sjálvdrátti. Tað má hvør einstakur tinglimur gera sær greitt.

Eg kann ikki annað enn at taka undir við virda rithøvundanum Hanusi Kamban, tá ið hann fyri fáum árum síðani staðfesti, at:

*Samanhald og framskygni krevja røkt, og kanska hava vit í okkara eginkærleika og sókn eftir materiellum virðum gloymt at leggja aftrat andans eldi og blása á samhaldsins glóð.*

Her í Løgtinginum leikar mangan hart á. Og nú enn eitt tingár byrjar, vóni eg, at vit tora at lurta eftir

hvør øðrum – eins og Farao tordi at lurta eftir Jósefi. At vit tosa saman við góðum tóna – og at vit virða, at øðrvísi hugsanin hjá hinum flokkunum eisini kann vera góð.

Mest av øllum eiga vit við eyðmýkt at minnast, at vit øll vilja tað besta fyri land og fólk – sama hvønn dreym – og hvønn flokk – vit annars umboða.

Eg ynski øllum góða ólavsøku.

Gud signi Føroyar!

Aksel V. Johannesen
løgmaður

# ÍSKOYTISPARTUR TIL RØÐUNA

## STJÓRNAR- OG LÓGAMÁL

### Stjórnarskipan

Eitt stórt arbeiði er seinasta árið lagt í tilgongdina at tilevna eitt uppskot til stjórnarskipan Føroya. Grundstøðið undir arbeiðinum hevur verið uppskotið, sum § 25 tingnevndin legði fram í februar 2010. Fleiri fundir hava verið um uppskotið bæði ímillum formenninar í samgonguflokkunum og allar floksformenninar á tingi. Stórur dentur hevur verið lagdur á at fáa semju millum allar flokkarnar á tingi. Uppskotið til stjórnarskipan verður latið til almenna hoyring ólavsøkudag. Síðani verður tað latið tinginum til víðari viðgerð.

### Kunngerðir um skráseting av vápnum, vápnaprógv og trygd og goymslu av vápnum

Í mai 2015 samtykti Løgtingið at broyta vápnalógina soleiðis, at ymisk trygdarátøk vórðu sett inn í lógina, m.a. skráseting av vápnum og vápnaprógv. Neyðugu kunngerðirnar, sum fremja hesar lógarbroytingarnar, eru nú gjørdar. Kunngerð um skráseting av vápnum, kunngerð um vápnaprógv og kunngerð um trygd og goymslu av vápnum eru settar í gildi. Umhvørvisstovan umsitur vápnaskránna og skrivar út vápnaprógv. Síðan 1. januar 2017 eru 5693 vápn skrásett í vápnaskránni hjá Umhvørvisstovuni, sum hevur útskrivað 2168 vápnaloyvi. Undirvísingartilfar til vápnatrygdarskeið er góðkent, og fyrstu vápnatrygdarskeiðini vórðu hildin á heysti 2016. Í dag eru 6 góðkendir veitarar av vápnatrygdarskeiði, og 20 persónar eru góðkendir sum undirvísarar til vápnatrygdarskeið. Miljø- og Fødevareministeriet hevur góðkent, at føroyska vápnaprógvið kann brúkast til at fáa útskrivað "gæstejagttegn" í Danmark.

### Nýggj løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing

Nýggj lóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing er samtykt. Lógin ger tað lættari at verja fólk, sum verða tráfylgd (stalkað) ella órógvað. Eitt nú verða reglurnar um tilhald greiðari, og eisini verður møguligt at vísa einum harðligum persóni burtur úr heiminum.

### Tryggingaravtalulógin broytt viðvíkjandi brúki av íleguupplýsingum um tryggingartakarar

Í sambandi við at Heilsumálaráðið læt úr hondum útgreinan av lóggávuni á humangenomøkinum í Føroyum í august 2015, varð ein arbeiðsbólkur settur at kanna og meta um lóggávuna á økinum. Arbeiðsbólkurin mælti m.a. til, at § 3 a í donsku tryggingaravtalulógini verður sett í gildi fyri Føroyar, soleiðis at tryggingarfeløg ikki kunnu nýta genomupplýsingar hjá einum tryggingartakara í sambandi við, at tryggingaravtalur verða gjørdar. Broyting er nú gjørd í Tryggingaravtalulógini, sum skal forða fyri, at fólk, tá ið ein vanlig tryggingaravtala ella pensjónsavtala verður gjørd, verða noydd at fáa til vega upplýsingar, sum skulu lýsa ein arvafrøðiliga treytaðan váða fyri at fáa sjúkur í framtíðini, og at tryggingarfeløg kunnu nýta slíkar upplýsingar til sín fyrimun. Hetta verjir tryggingartakaran fyri mismuni bæði í sambandi við, at ein tryggingaravtala verður gjørd, og eisini fyri einum møguligum trýsti at lata seg arvafrøðiliga kanna.

### Dagføring av passlógini

Passlógin, sum er galdandi í Føroyum, er dagførd. Við samtyktu broytingunum er heimild at áseta, at umsókn um pass verður send gjøgnum talgilda skipan. Umframt vanliga gjaldið fyri pass skal eisini serstakt gjald latast fyri at fáa talgilt fingraprent í passið. Gjaldið fyri pass til vaksin og fyri pensjónistar, sum hava fylt 67 ár, er dagført.

**Dagføring av lóggávu, sum er galdandi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum**
Lóggávan, sum er galdandi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum og av føroyskum málum, er dagførd. Offentlighedsloven er sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av føroyskum málum – bæði í Føroyum og í Danmark. Fyri føroyskar myndugleikar verður løgtingslóg um almenn innlit framvegis galdandi. Eisini er Lov om behandling af personoplysninger sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av persónsupplýsingum í Føroyum. Fyri føroyskar myndugleikar verður løgtingslóg um persónsupplýsingar framvegis galdandi.

**Dagføring og føroyskan av revsilógini**
Reglurnar um kynslig brotsverk í kap. 24 í revsilógini eru dagførdar og nútíðargjørdar og orðaðar á føroyskum. M.a. er neyðtøka víðkað til eisini at fevna um annan ólógligan tvingsil, misnýtslu av persóni í hjálparleysum tilstandi ella støðu og samlegu við børn undir 12 ár. Ásetingin um ólógligan tvingsil, misnýtslu av sálarsjúkum og onnur grov misnýtsla er víðkað til eisini at fevna um brot, framt í hjúnalagi. Fyrningarfreistin er longd fyri ávís brotsverk, og ættleiðing og lívfrøðiligur skyldskapur eru javnsett við blóðskemd.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa alla revsilógina dagførda og á føroyskum máli. Revsilógin er býtt í tveir partar: ein almennan part og ein serligan part. Í almenna partinum, kap. 1–11, eru reglur um treytirnar fyri at revsa, so sum aldur á tí, ið framt hevur misbrotið, ríkisborgaraskapur, brotsstaður, neyðverja, saknæmi (tilregnelighed), reglur um brotsroynd, meðvirkni og reglur um dømdu revsingina. Í serliga partinum eru tey vanligu brotsverkini, so sum brotsverk móti statinum, tí almenna reglulagnum, lív og likami, persónliga frælsinum, kynslig brotsverk, fíggjarbrotsverk, narkotikabrotsverk o.a. Tað eru bara tey álvarsligastu brotsverkini, sum eru reglusett í revsilógini. Onnur brotsverk eru reglusett í serlóggávuni.

Ein dagføring av allari revsilógini er eitt sera stórt arbeiði og rættiliga tíðarkrevjandi. Ætlanin er tí at býta dagføringina av revsilógina sundur í hóskandi partar. Hetta fer samstundis at gera tað møguligt hjá landsstýrinum og løgtinginum at kunna viðgera dagføringarnar betur og gjøllari, bæði málsliga og innihaldsliga. Dagføringin av allari revsilógini fer væntandi at taka umleið 5 ár.

Í komandi tingsetu er ætlanin at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um dagføring av kapittul 25–29 í revsilógini. Hesir kapitlar fevna um hesi brotsverk: Kapittul 25: Brot móti lívi og likami. Kapittul 26: Brot móti persónligum frælsi. Kapittul 27: At valda ónáðir og ærumeiðing (Freds- og ærekrænkelser). Kapittul 28: Fíggjarbrotsverk. Kapittul 29: Serligar ásetingar viðvíkjandi løgfrøðiligum persónum. Síðan verður næstu 4 árini hildið fram við at dagføra hinar kapitlarnar í serliga partinum, og at enda kapitlarnar í almenna partinum.

**Lógardygd**
Seinastu árini hevur verið arbeitt miðvíst við at bøta um dygdina á lóggávuarbeiðinum hjá landsstýrinum. Tann 1. mars 2015 kom í gildi *Rundskriv um uppseting og broyting av løgtingslógum og kunngerðum, um uppseting av ríkislógartilmælum og um uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini*. Rundskrivið hevur fimm partar, sum eru partur I–V. Rundskrivið ásetur bindandi reglur um, hvussu m.a. løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar frá landsfyrisitingini skulu setast

upp. Frá 1. juli er rundskrivið víðkað við reglum um, hvussu rundskriv (cirkulære) og leiðbeiningar skulu setast upp, og nær tað er rættast at nýta hesi.

Fyri at kunna um innihaldið í rundskrivunum hevur lógartænastan eisini havt skeið um lógardygd fyri starvsfólkum í landsfyrisitingini umframt fyri tey, sum arbeiða við lóggávu á stovnunum undir landsfyrisitingini. Skabilónir eru gjørdar at nýta til at skriva uppskot til lógir og kunngerðir. Øll lógar- og kunngerðaruppskot skulu eftirkannast av lógartænastuni, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Eisini verður ein ársfrágreiðing um eftirkanning gjørd, hvørs endamál er at upplýsa stjórnarráðini um tað, sum lógartænastan í síni eftirkanning er komin fram á, og sum verður hildið at hava almennan áhuga hjá øllum stjórnarráðunum.

Lógartænastan er farin undir at dagføra og víðka rundskrivið frá 2015.

**Endurskoðan av persónsupplýsingarlógini**

ES hevur samtykt eina nýggja Persóndátareglugerð, sum kemur í staðin fyri higartil galdandi samtykt 95/46. Reglugerðin kemur í gildi í ES- og EØS-londunum tann 25. mai 2018. Í Føroyum er galdandi løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum í stóran mun er grundað á ES samtyktina 95/46 eins og onnur lík lóggáva í Norðurlondum. Við avgerð hjá ES kommissiónini 5. mars 2010 [1] vórðu Føroyar góðkendar sum trygt triðjaland. Nú ES fær nýggja reglugerð um persónsupplýsingar, mugu vit endurskoða okkara lóggávu um persónsupplýsingar fyri at staðfesta, um tað fer at verða neyðugt at gera broytingar í føroysku lóggávuni, um Føroyar framhaldandi skulu vera góðkendar sum trygt triðjaland.

Lógartænastan er saman við Dátueftirlitinum farin undir hetta arbeiðið, og ætlanin er, at lógaruppskotið skal vera liðugt í 2018.

**Arbeiðið at gera nýggja rættargangslóg fyri Føroyar er byrjað**

Rættargangslógin fyri Føroyar er rættuliga afturúrsigld borin saman við rættargangslógina, sum er galdandi fyri Danmark. Talan er ikki einans um smávegis frábrigdi, men um sera víðfevndar og prinsipiellar munir á lóggávunum. Fleiri enn 200 lógarbroytingar eru gjørdar í donsku rættargangslógini, sum ikki eru settar í gildi fyri Føroyar. Flestu av hesum lógarbroytingum eru grundaðar á nýggja tøkni, fjølbroyttari rættarstøðu, bøtta rættartrygd og betri alment innlit í arbeiðið hjá dómstólunum. Hetta er sera óheppið, í øllum førum so leingi sum Føroya rættur er ein samfeldur partur av tí donsku dómstólsaskipanini, og hvørs dómar skulu roynast av landsrætti og hægstarætti.

Tessvegna heitti løgmaður í juli 2016 á danska løgmálaráðharran um at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til eina fullkomna dagføring av rættargangslógini fyri Føroyar. Í mai mánaði í ár varð arbeiðsbólkurin settur við umboðum frá Løgmansskrivstovuni, Føroya rætti, Fútanum, Føroya Advokatfelagi, Fróðskaparsetrinum, Ríkisumboðnum, Domstolsstyrelsen, Dommerforeningen og Løgmálaráðnum. Væntandi fer hetta arbeiðið at taka 2 ár.

[1] Commission Decision of 5 March 2010 pursuant to Directive 95/46/EC of the European Parliament and of the Council on the adequate protection provided by the Faeroese Act on processing of personal data (notified under document C(2010) 1130) (2010/146)

## FISKIVINNU- OG LANDBÚNAÐARMÁL

### Fiskivinnan

Eitt av høvuðsmálunum hjá landsstýrinum er at fremja eina nýskipan innan fiskivinnu føroyinga. Fyri at røkka hesum máli varð eitt týðandi stig tikið á leiðini fram, tá uppskot til nýggja løgtingslóg varð lagt fram á Løgtingi undir heitinum *fyrisiting av sjófeingi*. Hetta uppskot skal tryggja grundarlagið fyri tí nýskipan, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja.

Høvuðsmálini í nýskipanini eru millum annað:

- Føroyar skula gerast undangonguland í heiminum at umsita sítt livandi ríkidømi í sjónum varandi og burðardygt
- Føroyar skula veita bestu umstøður og skipan til støðugt at økja virði og dygd í sjófeingi okkara
- Føroyar eru matvøruframleiðandi tjóð og skula á hesum øki teljast millum fremstu lond at framleiða dygdar- og hávirðisvørur
- Føroyar skula tryggja, at tað verður gjørligt hjá fólki her í landinum, at taka lut í føroyskari fiskiveiðu eftir greiðum og javnbjóðis treytum í marknaðargrundaðari skipan
- Føroyar skula tryggja møguleikar hjá fólki og vinnu kring landið at taka lut í og bjóða seg fram at menna eina fjølbroytta og nýskapandi fiskivinnu
- Føroyar skula tryggja, at tað verður munandi lættari hjá teimum vinnurekandi sjálvir at velja, hvørji vinnutól skula nýtast til veiðu, hagreiðing og meirgóðsking

Nýskipanin og málini øll hvíla á ta aðalreglu, at sjófeingið er ogn Føroya fólks og varandi grundarlag undir føroyska búskapinum. Sjófeingið kann hvørki í lóg ella í verki gerast privat ogn.

Ítøkilig stig eru tikin í 2016 og 2017, sum beinleiðis kunna setast í samband við fiskivinnunýskipanina hjá landsstýrinum. Royndir vóru gjørdar í 2016 at selja veiðirættindi á uppboði. Úrslitini av hesum royndum vóru sera gagnlig, og í 2017 verður skipað fyri uppboðssølu av veiðirættindum eftir líknandi leisti sum í 2016. Uppboðssølan verður skipað eftir tveimum høvuðsleistum, soleiðis at til ber at bera saman fyrimunir og vansar við ymsum skipanum. Royndirnar frá nevndu sølum verða brúktar í sambandi við skipan av fiskivinnuni eftir 1. januar í 2018.

Í altjóða fiskivinnusamstarvi hava Føroyar framhaldandi sín virkna leiklut. Rættindi hjá Føroyum vera ment og røkt við virknari luttøku innan strandalandasamstarv og innan sínámillum samstarv við onnur lond. Landsstýrið er støðugt í sambandi við fiskivinnuumboð í Norðurlondum. Leiðandi umboð fyri russisku fiskivinnuumsitingina hava vitjað í Føroyum, og umboð fyri landsstýrið hava eisini hitt leiðandi umboð fyri bretsku umsitingina í sambandi við nýggju støðuna, ið kemur í, tá ið Bretlandi tekur seg úr ES.

**Fiskiveiðieftirlit**
Arbeiðið hjá Fiskiveiðieftirlitinum verður styrkt. Játtanin í 2017 hækkar soleiðis, at eftirlitsfólk kann setast afturat. Ein støðug menning er á stovninum tøkniliga, og í komandi tíðum verður allur flutningur av upplýsingum í sambandi við dagbøkur skipaður talgilt.

Sjøtul er settur á arbeiðið at kanna keyp av yngri skipi fyri Tjaldrið, ið brátt er 40 ára gamalt.

Í sambandi við fiskivinnunýskipanina verður umsitingin í breiðari høpi eftirmett og dagførd. Umsitingin av allari loyvisskipanini er løgd til stovn undir stjórnarráðnum og støða skal takast til, hvussu útluting av veiðirættindum verður løgd í endaliga og varandi skipan, bygnaðarliga.

**Tilbúgving**
Ein týðandi partur av tilbúgvingini er samskipanin av tilbúgvingarátøkum á sjónum, ið sjóbjargingarstøðin MRCC stendur fyri. Tekniski útbúnaðurin á økinum er dagførdur. Í hesum døgum samskifta umboð fyri stovnin við Føroya Tele um eina ætlan, at Føroya Tele í framtíðini yvirtekur viðlíkahald og menning av tí samskiftisútbúnaði, ið MRCC hevur. Føroya Tele er ein munandi størri stovnur enn MRCC, og mett verður, at dagføring og menning á tøkniliga økinum best verður tryggjað í neyvum samstarvi millum stovnarnar.

Innan samskipandi partin av tilbúgvingini verður “Tilbúgving Føroya” dagførd. Tilbúgving Føroya lýsir karmarnar og ábyrgdarbýtið viðvíkjandi tilbúgvingini í Føroyum á sjónum, í luftini og á landi.
Tilbúgvingarlógin hevur nøkur ár á baki. Ætlanin er at endurskoða lógina til heystar, og á vári í 2018 verður frágreiðing løgd fyri Løgtingið um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, eisini um broytingar mega gerast í lógini.

Góð veðurtænasta er ein týðandi partur av góðari tilbúgving. Í hesum sambandi fer landsstýrið, saman við serkønum í Føroyum, at taka stig til at lýsa, hvussu ein føroysk verðurtænasta verður ment, eins og lýst verður, hvønn tørv staðbundin fólk hava á tænastuni.

**Fiskivinnumenning og gransking**
Landsstýrið hevur sett sær fyri, at stimbra undir støðugt at menna virðisøkingina í øllum liðum í okkara fiskivinnu. Tí er játtanin til fiskivinnuroyndir hækkað munandi úr umleið 3,5 mió. kr. hvørt ár til góðar 8,5 mió. um árið.

Í øðrum lagi er skipaður ein Fiskivinnugrunnur við fíggjarligum innskoti uppá 6 mió. kr. Ætlandi skal eitt fast lutfall av inntøkuni frá uppboðssølu av veiðirættindum flytast í henda grunn, eins og árlig játtan á fíggjarlógini. Harnæst skal grunnurin taka ímóti stuðli og fígging frá øðrum.

Ongin ivi er um, at samlaðu átøkini á økinum styrkja munandi um menningina innan tøkni, virðisøking, marknað og burðardyggan fiskiskap.

Leggjast skal afturat, at Landsstýrið arbeiðir við at endurskoða og samskipa tær skipanir, ið fíggja og hava til endamáls at menna gransking og vinnuliga nýskapan, og Fiskivinnugrunnurin verður partur av hesum arbeiði.

Bygnaðarliga er ætlanin at skipa Fiskivinnugrunnin og virki hansara í deplar kring landið, soleiðis at virksemið verður so nær tengt at vinnuøkinum sum tilber. Á tann hátt tryggja fiskivinnuroyndir og grunnur best haldgóð úrslit.

**Havrannsóknir**

Størsta stigið, ið er tikið innan økið havrannsóknir, er tikið av landsstýrinum í 2017, tá lóg varð samtykt um at byggja nýtt rannsóknarskip.

Vit fara undir at byggja framkomið havrannsóknarskip. Skipið kann gerast eitt av okkara fremstu amboðum til, at Føroyar gerast undangonguland í vísindaligum rannsóknum og fremstu vitan um allar okkara fiskastovnar og ta fjølbroyttu vistskipanina í havinum. Og at vit ganga undan í altjóða samstarvi, har vit útvega bestu vísindaligu prógv um felags og ferðandi fiskastovnar, sum er grundarlag fyri semjum og býti millum lond.

MEST skal standa fyri byggingini, og mett verður, at skipið kann latast landsstýrinum í 2020.

Tað er at fegnast um, at vit við sáttmála við MEST kunnu brúka og menna føroyskar førleikar at byggja eitt so framkomið skip í Føroyum.

Játtanin til Havstovuna er hækkað seinasta árið. Hækkanin skal setast í samband við fiskivinnunýskipanina hjá landsstýrinum í sambandi við stovnsmetingar. Endamálið er, at stovnsmetingar verða gjørdar fyri øll týðandi fiskasløg.

**Landbúnaður**

Á heysti í 2016 var stig tikið til eina arbeiðsætlan, ið hevur til endamáls at seta greið mál fyri okkara landbúnað og greitt vísa á átøk, ið kunna tryggja ella stimbra undir, at málini verða rokkin.

Settu málini eru skipað innan fýra øki: staðbundnar dygdarvørur, royndir/gransking/útbúgving, lendi og at velta burtur úr nýggjum og seinast; fígging og bygnaður. Tilfar er latið Fiskimálaráðnum á sumri í 2017, og nú verður farið ítøkiliga undir eina arbeiðsætlan, ið hevur til endamáls at fremja nevndu mál.

Á sumri í 2016 hevur Búnaðarstovan tikið ítøkilig stig í sambandi við móttøku av ull. Hóast átakið ikki gekk eftir vild í 2016 orsakað av tvørrandi møguleikum at selja ullina, so er ætlanin við betri móttøku ikki slept. Búnaðarstovan arbeiðir framhaldandi við málinum at fremja ábøtur í sambandi við at taka ímóti og hagreiða ullina.

Játtanin til landbúnaðarroyndir er hækkað nakað. Hækkanin verður millum annað nýtt til royndir og menning av grønmetisframleiðslu, ið er ein partur av tí størru ætlanini at menna framleiðsluna av staðbundnum dygdarvørum. Innan økið "staðbundnar dygdarvørur" fara landsstýrið og Búnaðarstovan at taka ítøkilig stig at stimbra undir gagnnýtsluna av føroyskum kálvakjøti. Í eykajáttanaruppskotinum á vári 2017, sum tó ikki varð samtykt, varð fígging merkt til endamálið.

Landsstýrið hevur heitt á Búnaðarstovuna um at hava eitt vakið eyga í sambandi við vandan av ridluskriða. Serstøk játtan er tøk til arbeiðið í 2017.

## FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL

Við búskaparligum hákonjunkturi sumrar í Føroyum. Týðandi er, at vit nú í góðum tíðum bjálva búskapin til heystið og veturin, sum einaferð kemur, og brynja føroyska samfelagið til framtíðina. Týðandi fyritreyt fyri at brynja og bjálva okkara samfelag er at fremja átøk, ið gera føroyska búskapin fíggjarliga haldføran og sjálvbjargnan. Hesi høvuðsmál verða tí raðfest í Fíggjarmálaráðnum komandi árið.

**Fíggjarlógin fyri 2018**
Tá samgongan tók við landsins leiðslu á heysti 2015, hevði landið havt stór hall síðan 2008. Samgongan setti sær tí beinanvegin fyri at venda halli til avlop og løgdu tí eina fíggjarlóg fyri Løgtingið við avlopi. Endaliga rakstrarúrslitið fyri 2016 gjørdist avlop á 158 mió. kr. Í 2017 væntast avlop oman fyri 200 mió. kr., og miðað verður eftir, at úrslitið á fíggjarlógini fyri 2018 verður 330 mió. kr. í avlopi fyri lønarvøkstur.

Í hesum tingárinum verða fleiri øki raðfest til at røkka politisku málum landsstýrisins, so sum fólkaatkvøða um Stjórnarskipan Føroya, styrktur Búskapargrunnur Føroya, økt játtan til fleiri serlæknar, hækkaður lestrarstuðul, fleiri útbúgvingar, heimtøka av útlendingamálum, munandi fleiri bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum, samferðsluútbyggingar v.m. Dentur verður samstundis lagdur á at halda rakstrarvøksturin á lágum støði (íalt um 2,5%), og hetta setur stór krøv til landsstýrisfólk um støðugt at fremja tillagingar, soleiðis at hvør króna hjá landinum verður nýtt so skynsamt sum møguligt.

**Játtanarkarmar fyri árini 2019–2023**
Játtanarkarmarnir leggja yvirskipaðu fíggjarpolitisku karmarnar fyri landið og politisku kós samgongunnar komandi fimm árini. Innan hesar játtanarkarmarnar, ið fevna um umleið 5 mia. kr. á útreiðslusíðuni og tað sama á inntøkusíðuni, verður politikkur samgongunnar framdur.

Landið hevði hall á umleið 3 mia. kr. í tíðarskeiðnum 2008–2015. Men samtyktu játtanarkarmarnir fyri 2018–2022 hava vaksandi avlop úr 330 mió. kr. upp í 455 mió. kr. komandi árini, tí samgongan metir tað alneyðugt at rinda aftur skuldina og at bjálva føroyska búskapin til verri tíðir. Soleiðis kunnu vit fáa ein meira sjálvbjargnan búskap.

Fíggjarlógir landsins skulu í høvuðsheitum fremjast innanfyri samtyktu játtanarkarmarnar. Í vár samtykti Løgtingið játtanarkarmar fyri 2018-2022, og fíggjarlógin fyri 2018 verður tí smíðað eftir samtykta játtanarkarminum.

**Búskapargrunnur Føroya virkar fyri sjálvbjargnum búskapi**

Búskapargrunnur Føroya skal nú gerast virkið amboð at røkka einum meira støðugum, sterkum og sjálvbjargnum føroyskum búskapi, ið tekur hædd fyri bæði núverandi og komandi ættarliðum.
Í fjør varð fyri fyrstu ferð nakrantíð peningur settur í Búskapargrunn Føroya. Talan var um 23 mió. kr. frá søluni av seinasta partinum av LÍV til fakfeløgini. Hartil varð lógarbroyting samtykt, ið ásetir, at partur av avlopi landskassans framyvir verður settur í Búskapargrunnin. Ítøkiliga er talan um, at 20% av avlopi landskassans upp til 200 mió. kr., og 50% av avlopi landskassans omanfyri 200 mió. kr. verða sett í Búskapargrunn Føroya. Í hesi tingsetuni verða útgjalds- og inngjaldsparturin tillagaðir, soleiðis at Búskapargrunnurin í enn størri mun røkkur endamáli sínum.

**Pensjónsnýskipan skal nú fremjast í verki**

Almannamálaráðið og Fíggjarmálaráðið arbeiða í tøttum samstarvi við at leggja til rættis eitt tilmæli til politisku skipanina um eina pensjónsnýskipan. Arbeiðið er sera umfatandi og viðger allar týðandi tættir í føroysku pensjónsskipanini. Umboð fyri allar politisku flokkarnar hava arbeitt saman í pensjónsnýskipanarbólki síðani januar í 2016.

**Landsbanki Føroya fær sterkari heimildir til tess at styrkja fíggjarliga støðufestið**

Landsbanki Føroya og Føroya váðaráð eru stovnsett og skulu í felag virka fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Føroyar eru seinastu áratíggjuni raktar av fleiri fíggjar- og búskaparkreppum. Hesar hava kostað samfelagnum, vinnuni og Føroya fólki nógv, bæði tá ið um ræður fíggjarlig virði, trivnað, sjálvbjargni og fólkatal. Við lógarbroyting í bankalóggávuni í heyst fara Landsbanki Føroya og Føroya váðaráð eisini í bankalóggávuni at fáa víðfevndar heimildir til atgongd til upplýsingar frá føroysku bankunum. Talan er um upplýsingar, ið eru neyðugar fyri støðugt at halda eyga við yvirskipaðu fíggjarligu váðunum í Føroyum og at ávara um møgulig tekin um váða.

**Dagførd bankalóggáva skal byrgja fyri fíggjarkreppum og styrkja búskapin**

Lóggávan fyri føroysku bankarnar verður dagførd í heyst. Hetta er seinasti parturin av seinasta bankapakkanum. Hesin seinasti parturin skal eitt nú tryggja, at teir serliga týðandi bankarnir í samfelagnum, teir, ið nevndir verða SIFI bankar, skulu vera so fíggjarliga sterkir, at hesir syrgja fyri egnum bjargingarpakka, um okkurt skuldi mishepnast í framtíðini. Hetta fer at seta nýggj og herd krøv til bankarnar í Føroyum – krøv, ið fara at gera føroysku bankarnar enn tryggari og sterkari at standa ímóti komandi kreppum á altjóða fíggjarmarknaðunum.

**Búskaparstýring og samskipan millum land og kommunur**

Fíggjarmálaráðið hevur tikið stig til at fremja betri búskaparstýring og samskipan millum land og kommunur. Í fyrsta umfari er hetta gjørt við, at játtanarkarmarnir fyri 2018–2022 eisini hava tilmæli um rakstrarvøkstur og samlaðan íløguvøkstur hjá kommununum.

Land og kommunur eru bæði týðandi partar av føroyska búskapinum. Tí ber ikki til at fremja veruliga búskaparstýring, um partarnir ikki samstarva tætt. Fleiri fundir hava verið við Kommunufelagið um møguligar loysnir hesum viðvíkjandi, og ætlanin er at fáa eina hóskandi loysn til frama fyri allar partar.

**Bústaðir – ein fjøltáttaður bústaðarmarknaður til alt fólkið**
Eitt fjøltáttað útboð av bústøðum, eisini íbúðir fyri rímiligan kostnað, lestraríbúðir og bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum eru týðandi tættir í at skapa trivnað, fólkavøkstur og at lækka kostnaðarstøðið.

Bústaðaravbjóðingin er stór í hesum døgum. Hetta er ein avbjóðing, sum allir partar mugu loysa í felag. Landið hevur valt at geva Bústøðum heimild til – umvegis Landsbanka Føroya – at útgeva lánsbrøv og/ella taka lán upp í 250 mió. kr., tað, sum svarar til at byggja umleið 200 nýggjar leigubústaðir. Hetta virksemi væntast at verða sett í gongd í hesi tingsetuni. Við hesum koma Bústaðir at hava um 500 leigubústaðir.

Men hetta loysir bert avmarkaðan part av bústaðaravbjóðingini. Mett verður, at tørvur er á umleið 2.000 nýggjum íbúðum. Landið skal ikki loysa hesa avbjóðing einsamalt. Tað er og verður neyðugt, at tað privata og aðrir partar eisini fremja átøk at loysa bústaðaravbjóðingina.

**Nýggjar ásetingar um transfer-pricing og tilfeingisgjald**
Til tess at styrkja eftirlitið við, at virðisøking í Føroyum kemur føroyska samfelagnum til góðar, verður eftirlitið við transfer-pricing hert í lóggávuni. Eisini verður nýggj lóg um tilfeingisgjald orðað sum partur av fiskivinnunýskipanini, og skulu dagføringar eisini til í skattalógini samsvarandi hesum.

**Barnafrádrátturin skal vera meira tíðarhóskandi**
Í dag mugu foreldur, ið ikki liva saman, velja, hvør teirra skal hava rætt til barnafrádráttin – eisini hóast børnini møguliga búgva eins nógv hjá báðum. Ynskt verður at gera skipanina meira tíðarhóskandi og at geva foreldrum rætt til at býta barnafrádráttin sínámillum í størri mun enn í dag. Hetta fyri at tryggja, at barnafrádrátturin í enn størri mun kemur børnunum til góðar.

**Fyritíðarpensjónistar fáa tað fíggjarliga léttari**
Fyritíðarpensjónistar skulu hava størri fíggjarligt rásarúm. Miðað verður tí eftir, at skattalætti verður latin fyritíðarpensjónistum í tingárinum. Hetta er – eins og longu framdu átøkini við skattalætta til lág- og miðallønt, familjuískoyti til barnafamiljur, hækkaðum barnafrádrátti og hægri lestrarstuðuli – átøk fyri at røkka málinum um at býta framgongdina og virðini javnari í samfelagnum.

**Varskógvaraskipan fyri starvsfólk í almennum starvi**
Fyri at styrkja fíggjargeiran og fíggjarliga støðufestið er sett í verk lógarkrav um, at starvsfólk, ið virka innan fíggjargeiran, skulu kunna boða frá um møguligt óreglusemi til heilar tvær varskógvaraskipanir: Eina innanhýsis og eina hjá fíggjareftirlitinum.

Tað almenna røkir týðandi tænastur vegna fólk og land. Í mongum førum er talan um tænastur, ið hava beinleiðis við vælferðina hjá einstøkum borgarum at gera. Tíðin er komin til, at vit gera eins nógv fyri at skapa trygd um tænastur til borgaran, sum gjørt verður fyri at skapa trygd um fíggjargeiran.

Farið er tí undir at seta í verk eina varskógvaraskipan fyri starvsfólk í almennum starvi. Endamálið er at styrkja rættartrygdina og vælferðarsamfelagið í Føroyum.

**Talgildan samleika til allar føroyingar**

Lóg um Talgildu Føroyar er samtykt og sett í verk. Endamálið er geva føroyingum ein lættari gerandisdag, at gera vælferðarsamfelagið betri og at styrkja kappingarførið hjá vinnu og landi.

Menningin av talgilda samleikanum fer fram í hesi tingsetuni. Hvør einstakur føroyingur og allar føroyskar fyritøkur v.m. fara at fáa egnan talgildan samleika, ið m.a. kann nýtast sum løgfrøðiliga bindandi undirskrift, og fer hesin eini samleikin í stóran mun eisini at koma í staðin fyri mongu "log-in" skipanirnar, ið føroyingar nýta í dag.

Sambært ætlan verða føroysku bankarnir og Taks millum fyrstu tænasturnar, ið føroyingar fara at kunna nýta nýggja talgilda samleikan til, eitt nú at fáa atgongd til netbanka og skattaaupplýsingar umvegis egnan borgaraportal. Ein nýggj virkisskrá og talgilding av galdandi grunddátaskráum eru eisini partar av Talgildu Føroyum, eins og settur er í verk ein talgildur "motorvegur", sokallaða Heldin, sum fer at gera alt dátasamskiftið millum stovnar, fyritøkur og borgarar tryggari og lættari at menna framyvir.

**Fíggjarligur fyrimunur at velja el- ella vetnisakfar**

Málið er, at orkunýtslan á landi í størst møguligan mun kemur frá varandi orkukeldum í 2030. Skal hetta eydnast, er neyðugt, at eisini privat húsarhald fara at leggja um til grønari loysnir longu nú. Til tess at eggja fólki at velja umhvørvisvinarligar loysnir, er tíðaravmarkað skipan sett í verk fyri el- og vetnisakfør: Ongin vegskattur, onki skrásetingargjald og MVG endurgoldið. Sostatt eru nú fíggjarligir fyrimunirnir við at velja eitt umhvørvisvinarligt akfar. Eisini er sett í verk MVG afturbering fyri góðkendar grønar hitaskipanir til bústaðir.

Í tingárinum er hartil ætlanin at broyta skrásetingargjaldið fyri akfør, soleiðis at hetta – eins og vegskatturin – verður broytt til í størri mun at verða heft at, hvussu nógv akfarið dálkar.

**Dagføringar í kaptalvinningsskattalóg**

Kapitalvinningsskattalógin verður dagførd í hesi tingsetuni. Higartil hevur Løgtingið samtykt sonevndar exit og entry reglur. Exit-reglurnar tryggja, at kapitalvinningur vunnin í Føroyum kemur til skattingar, tá persónur flytur av landinum. Entry-reglurnar tryggja, at persónur, ið flytur til Føroyar, ikki kemur at gjalda skatt av kapitalvinningi, vunnin meðan persónurin búði í øðrum landi. Í løtuni verður øll kapitalvinningsskattalógin gjøgnumgingin saman við hinum skattalógunum. Gjøgnumgongdin hevur til endamáls at tryggja, at hol ikki eru í hesum lógum, greina løgfrøðilig ivamál – og koma við uppskot-um, ið gera lógirnar lættari at umsita. Eisini verður hugt eftir, í hvønn mun lógirnar eru búskapar- og vinnupolitiskt skilabestar.

**Endurskoða tagnarskyldu og upplýsingarskyldu í skattalóg**

Herda tagnarskyldan í § 151 í Skattalógini varð ásett langt áðrenn, vit fingu vanligar innlitsreglur og fyrisitingarlóg. Tíðin er komin til at endurskoða hesa áseting. Eisini verður upplýsingarskyldan hjá vinnurekandi feløgum endurskoðað.

**Betri atgongd til ferðafólkalistar**

Til tess at tryggja, at tollvaldið fær betri møguleikar at fremja eftirlit við flutningi av rúsevnum, verður ynskt at styrkja heimildirnar hjá hesum at fáa atgongd til ferðafólkalistar hjá flutningsfeløgum, ið flyta ferðafólk til Føroya. Hetta er liður í arbeiðinum og ynskinum um at steðga innflutningi og sølu av rúsevnum í Føroyum.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL

**Oljuvinna**

Vit fara nú undir 4. útbjóðingarumfar eftir kolvetni í føroysku undirgrundini, og við hesum seta vit aftur ferð á leiting eftir kolvetni undir Føroyum. Verður kolvetni í lønandi nøgdum funnið, kann hetta skapa nýggjar inntøkur til samfelagið – bæði við nýggjum vinnuligum virksemi og avgjøldum til landskassan. Oljuvinnan kann tí gerast enn ein súla undir okkara búskapi og samfelagi.

**Skapandi vinnur og íverksetan**

Fyri góðum ári síðani varð fyrsti yvirskipaði politikkurin fyri skapandi vinnur orðaður, og farið er undir at fremja fyrstu tilmælini. Átøkini, sum landsstýrið hevur raðfest fremst, eru at skipa filmshús, ið letur upp seinni í ár og ein afturberingarskipan til útlendskar filmsframleiðslur, ið somuleiðis verður sett í verk í ár. Arbeitt verður víðari við fleiri av átøkunum í politikkinum, og ætlanin er at leggja eina tíðar- og kostnaðarætlan fyri Løgtingið í heyst og skipa fyri aðalorðaskifti um skapandi vinnur.
Føroysku vinnuframaskipanirnar eru í nógvum smáum pørtum, og avbjóðingin hjá øllum pørtunum er at kenna serøkini hjá hvørjum øðrum og at lyfta í felag. Arbeitt verður tí fyri at skipa eitt sterkt tvørfakligt umhvørvi.

**Maritim strategi**

Samgongan hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu mennast sum maritimur tænastudepil og shippingland. Skulu vit røkka málinum, er neyðugt við eini yvirskipaðari ætlan, sum fevnir um allar tættir í sjóvinnuni, so sum lógarkarmar, FAS, tænastur, útbúgvingar og marknaðarføring. Tilmælið um sjóvinnu varð latið landsstýrinum í ár, og farið verður nú undir at seta tilmælini í verk. Á fíggjarlógini er serstøk játtan til at menna og marknaðarføra Føroyar sum maritiman tænastudepil. Landsstýrið og Oljuvinnufelagið hava kunngjørt eina greining, sum lýsir, hvussu virksemið innan maritimar tænastur kann vaksa. Harumframt er ein lýsingarfilmur gjørdur, ið skal marknaðarføra Føroyar sum sjóvinnutjóð.

**Yvirtøka av útlendingamálum og samlaging (integratión)**

Beint eftir valið varð sjøtul aftur settur á arbeiðið at yvirtaka útlendingamál. Arbeiðið er komið nakað áleiðis. Tó hevur tað víst seg at vera ein avbjóðing at fáa eina semju við Schengen-myndugleikar um markaeftirlitið. Men gongst eftir ætlan, verður greiða fingin á hesum spurningi í ár. Somuleiðis eru Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Útlendingastovan og danska embætisverkið, í gongd við at gera neyðugu útgreiningarnar, so endaliga avgerðargrundarlagið til eina yvirtøku verður klárt.

Í dag eru umleið 1300 útlendingar í Føroyum, og talið økist alsamt. Umráðandi er, at útlendingar verða integreraðir í føroyska samfelagið. Arbeiðið at tilevna og seta í verk eina samlagingar(integratións)ætlan er farið í gongd. Arbeiðið fevnir m.a. um kunningartilfar, betur skipaða undirvísing til útlendingar og átøk á arbeiðsmarknaðinum. Føroyskir myndugleikar hava eisini leitað sær íblástur frá royndum í øðrum londum við samlaging (integratión), m.a. í Íslandi.

**Ferðavinnupolitikkur**

Føroysk ferðavinna hevur tikið dik á seg seinnu árini. Keyp og søla í ferðavinnuni kom upp á 665 mió. kr. í 2015, og sostatt er líkt til, at málið um ein umsetning á 1 mia. kr. í 2020 verður rokkið. Menningin innan vinnuna er týðilig, og ár undan ári síggja vit nýggj tilboð bæði innan gisting, matstøð og upplivingar. Vøksturin innan ferðavinnuna hevur tó eisini sett sjóneykuna á viðurskifti og avbjóðingar, sum mugu loysast, um ferðavinnan skal verða burðardygg. Flestu støðini hava megnað at skipað seg væl og fáa ágóða av økta talinum av ferðafólki. Men eisini eru støð, har tað er átrokandi við átøkum, um tað ikki skal fáa avleiðingar fyri náttúru og djóralív.

Í mai mánaði varð heildarætlan um ferðavinnumenning liðug. Heildarætlanin er ein røð av tilmælum um, hvussu vit menna ferðavinnuna á burðardyggum grundarlagi. Arbeiðið at seta í verk tilmælini er farið í gongd. Ætlanin er í fyrstu syftu at skipa nýggja menningardeild undir Visit Faroe Islands, sum fær uppgávuna at standa fyri innlendis ferðavinnumenning. Saman við eini náttúruverndarlóg og -umsiting eru hetta týdningarmestu fortreytir fyri eini meiri miðvísari menning av ferðavinnuni.

**Alilóggávan**

Alivinnan er eftir fáum árum vorðin fremsta útflutningsvinna í Føroyum. Hetta er ikki minst framsøknum leiðslum og dugnaligum starvsfólki í alivinnuni at takka. Vit eiga øll at hava felags áhuga í at tryggja, at karmarnir um alivinnuna frameftir eru soleiðis háttaðir, at teir ikki einans tryggja lønsemi her og nú, men eisini viðvirka til eina vinnu, sum í longri tíðarhøpi livir í samljóði við vistfrøðiligu skipanina.

Alilóggávan verður tí endurskoðað í heyst. Endamálið er fáa eina greiðari og meira hóskandi skipan viðvíkjandi nýtslurættinum og atgongd til tøku aliøkini. Samgongan vil tryggja, at lívfrøðilig burðardygd verður enn sterkari meginregla, og skapa lógarkarmar fyri, at alivinnan fær betri møguleikar fyri at mennast og vaksa við nýggjari framleiðslutøkni, eitt nú aling á landi, á meira harðbalnum sjóøkjum og aling av skeljadjórum og tara.

**Eigarapolitikkur landsins**

Landsstýrið fer tíðliga í heyst at leggja fyri Løgtingið frágreiðing um eigarapolitikk landsins. Eigarapolitikkur landsins fevnir um partafeløg og onnur tílík vinnufeløg, sum landið eigur, og sum liggja uttanfyri fíggjarlógina og landsfyrisitingina. Eigarapolitikkur landsins eru leiðreglur um, hvussu eigaraleikluturin eigur at útinnast og um, hvussu leiðslan í almennu vinnufeløgunum útinnur sín leiðsluleiklut.

Endamálið við eigarapolitikkinum er
- at landið skal virka sum ein professionellur eigari,
- at vinnufeløg landsins virka eins og eitt væl rikið privat vinnufelag við atliti at munadyggum rakstri og íløgum, gjøgnumskygni, og eftirmeting av úrslitum, og
- at tryggja kapping á jøvnum føti millum almenn og privat vinnufeløg.

**Loftferðsluøkið**

Tá samgongan tók við, varð farið undir eina tilgongd at fáa loftrúmið á føroyskar hendur. Semja er við donsku stjórnina um ein leist og eina tilgongd fyri yvirtøkuna. Í løtuni verður løgd til rættis førleikamenning, so føroyskir myndugleikar kunnu røkja uppgávuna til fulnar, tá endaliga yvirtøkan verður framd. Næsta stigið er at yvirtaka loftferðslutænastuna í Vágum, og avtala um hesa yvirtøku verður klár í næstum.

**Matvøru- og matstovulóggáva**

Løgtingið samtykti í ár broytingar í matvørulógini. Lógarbroytingarnar hava til endamáls, at tryggja at smáir framleiðarar fáa høvi at selja sína vøru til handlar og matstovur, so føroyskar matvørur eru tøkar hjá flestu okkara, og føroyska matmentanin verður varðveitt og ment. Samstundis verður ein skrásetingarskipan sett í verk, ið skal tryggja, at tað verður lættari at eyðmerkja framleiðarar.

Í dag eru fleiri ymiskir myndugleikar, sum skulu veita ymisk loyvi í sambandi við matstovuvirksemi, og talan er um stirvnar og umsitingartungar mannagongdir. Økið verður tí endurskoðað, til tess at tað skal verða einfaldari at søkja um viðkomandi loyvi, eins og tað verður einfaldari at umsita matstovuvinnuna og hava eftirlit við henni. Hetta verður best rokkið við eini yvirskipaðari lóg, sum ásetur reglurnar fyri matstovuvinnuna.

**Djóraverndarlógin**

Nýggj lóg um djóravælferð kemur ístaðin fyri djóraverndarlógina, ið er frá 1985. Viðurskiftini eru munandi broytt seinastu gott 30 árini. Nýggja lógin hevur til endamáls at fremja tíðarhóskandi djóravælferð og djóravernd.

**Uttanríkismál**

Samgongan hevur sett sær sum mál, at Føroyar skulu reka egnan málvísan uttanríkispolitikk og sita við borðið, tá viðkomandi avgerðir verða tiknar fyri land og fólk okkara. Strembað verður eftir sjálvstøðugum limaskapi í norðurlendskum, evropiskum og alheims stovnum. Vit fara at endurskoða uttanríkispolitisku heimildarlógina, taka burtur avmarkingar og forðingar og betra okkara handilssambond og sáttmálar.

**Marknaðarfremjandi átøk á sendistovunum**

Útflutningur er grundarlag undir okkara búskapi og vælferð. Marknaðarføring av føroyskari vinnu er tí fokusøki í uttanríkispolitikkinum, og ein serlig játtan er sett av til marknaðarfremjandi átøk. Játtanin hevur verið brúkt til at fíggja eina røð av tiltøkum, ið sendistovurnar hava skipað fyri í samstarvi við vinnulívið, og tiltøk hava verið í Moskva, Kaliningrad, Reykjavík, Brússel, London og Kina.

**Fríhandil og marknaðaratgongd**
Turkiska tjóðartingið samtykti fríhandilssáttmálan við Føroyar í vár. Hjá okkum eru allar formligar mannagongdir lidnar. Bíðað verður nú eftir turkiskari ráðharragóðkenning, soleiðis at turkiska stjórnin formliga kann boða frá, at sáttmálin er endaliga staðfestur. Grundað á politisk órógv í Turkalandi hevur mannagongdin at góðkenna sáttmálan verið sera drúgv, men væntandi verður hann endaliga staðfestur av Turkalandi fyri árslok 2017.

Føroysk vinna hevur stóran áhuga í at útflyta vørur til suðurkoreanska marknaðin. Samskifti er við myndugleikarnar í Suðurkorea um handilsviðurskiftini millum Suðurkorea og Føroyar, til tess at frælsisgera vøruflutningin millum londini. Hetta arbeiðið gav longu úrslit fyrr í ár, tá ið tollurin á føroyskum vørum varð lækkaður munandi við tað at Føroyar fingu MFN støðu. Málið er at fáa ein fríhandilssáttmála við Suðurkorea. Í sambandi við tilgongdina er ætlanin, at landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum skal standa á odda fyri einum átaki í Seoul í heyst, har føroysk vinna og mentanarlív eisini vera partur.

Samskifti hevur verið við kinversku myndugleikarnar seinastu árini við tí fyri eyga at fáa ein fríhandilssáttmála við Kina. Neyðugt er við áhaldandi samskifti fyri at koma hartil, at ítøkiligar samráðingar kunnu byrja. Sum liður í hesum varð skipað fyri eini vinnuferð til Kina í november í fjør, og í juni í ár varð skipað fyri einum føroyskum tiltaki í Beijing. Heilsufrøðiligur sáttmáli varð um ársskiftið undirritaður við Kina, sum ger tað møguligt hjá føroyskum fyritøkum at útflyta makrel til Kina.

Arbeitt hevur verið í fleiri ár at fáa ein fríhandilssáttmála við Russland. Russland er partur av Evro-Asiatiska Búskaparsamveldinum saman við Hvítarusslandi, Kasakstan, Kirgisistan og Armenia. Ein fríhandilsáttmáli við Russland fevnir tískil um øll londini í felagsskapinum, og ein slík tilgongd er bæði drúgv og umfatandi. Russiski marknaðurin er sera týdningarmikil fyri Føroyar, og tað verður tískil løgd nógv orka í og áhaldandi arbeitt fyri at náa hesum máli, bæði á embætis- og politiskum stigi. Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum skal í hesum sambandi vitja í Moskva í september.

Brasilia kann gerast áhugaverdur marknaður hjá føroyskum útflutningsfyritøkum. Í fyrstu atløgu verður arbeitt við at fáa í lag heilsufrøðiliga avtalu við Brasilia, tí slík avtala verður mett sum fortreyt fyri at kunna flyta út fiskavørur til brasilska marknaðin.

Búskaparsáttmálin millum Føroyar og Ísland, Hoyvíkssáttmálin, hevur í gjøgnum árini verið fyri atfinningum frá føroyskari síðu. Fyri at beina burtur forðingar, sum føroyskar fyritøkur renna seg í, tá tær royna seg á íslendska marknaðinum, hevur landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum seinasta árið havt tríggjar fundir við íslendska uttanríkismálaráðharran. Útlit eru nú fyri, at nøkur av málunum, sum hava elvt til misnøgd frá føroyskari síðu, fara at verða loyst. Landsstýrið umhugsar tó eisini at taka upp samráðingar við Ísland um tillagingar í Hoyvíkssáttmálanum, m.a. fyri at fáa í lag greiðari skilnað millum málsevnini, sum Hoyvíkssáttmálin fevnir um, og tey evnini, sum verða regulerað av sínamillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Ísland.

**ES og EFTA**
Ein samráðingartilgongd verður fyrireikað til tess at fáa ein yvirskipaðan samstarvskarm við ES. Ein slíkur karmur skal styrkja tilvitanina um Føroyar í ES-kervinum og skapa eina fjøltáttaða fatan av Føroyum sum samstarvsparti á ymsum økjum. Partur av tilgongdini verður eisini at viðgera ítøkiligar avbjóðingar, sum føroyingar og føroyskt vinnulív renna seg í í ES- skipanini.

Arbeitt hevur verið miðvíst við føroyskum limaskapi í EFTA, síðani núverandi landsstýri kom til. Føroyska ynskið er tikið upp við EFTA-londini, bæði á embætisstigi og ráðharrastigi. Tað er tó lítið, ið bendir á, at føroyskur limaskapur í EFTA verður veruleiki í bræði – men arbeitt verður tó víðari við málinum.

**Brexit**
Úrslitið av fólkaakvøðuni í Bretlandi um at taka seg úr Evropasamveldinum kann fáa stóra ávirkan á føroysk viðurskifti. Føroyar og Bretland hava tøtt og søgulig sambond, bæði í handils- og fiskivinnuhøpi, og Brexit fær helst avleiðingar fyri alt samstarvið við Bretland. Tí setti landsstýrismaðurin við uttanríkis- og vinnumálum í fjør ein arbeiðsbólk at fylgja við tilgongdini og at gera tilmæli til landsstýrið. Eisini eru vit í sambandi við bretskar myndugleikar fyri at tryggja føroysk áhugamál eftir Brexit – ikki minst á handilsøkinum. Sendistova okkara í London er týdningarmikil partur av hesum arbeiði.

**Sjálvstøðugur føroyskur limaskapur í norðurlendska samstarvinum**
Í 2016 varð formlig umsókn um sjálvstøðugan føroyskan limaskap latin Norðurlandaráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum. Endalig støða er enn ikki tikin til umsóknina. Tó eru ábendingar um, at tað heldur ikki á hesum sinni fer at eydnast Føroyum at fáa sjálvstøðugan limaskap í norðurlendska samstarvinum. Í løtuni verður kannað, um møguligt er – í fyrstu syftu – at fáa styrkt føroyska leiklutin í samstarvinum.

**Samstarv í útnorðuri**
Í august 2016 var á fyrsta sinni skipað fyri einum trípartafundi millum uttanríkisráðharrarnar í Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Endamálið við fundinum, ið var í Havn, var at styrkja sambandið og samstarvið millum útnorðurlondini – og varð avtalað at hittast árliga frameftir.

**Landgrunsmálið**
Undirritanin av markasáttmálunum við Noreg og Ísland um ytra landgrunnin norðan fyri Føroyar er seinkað av ymiskum orsøkum. Men hesir sáttmálar verða væntandi undirritaðir seinni í 2017. Við hesum sáttmálum verður klárt hjá Føroyum at gera forkanningar við tí fyri eyga at fyrireika, at tað møguliga verður farið at útvinna ráevni.

**Mannarættindi**
Føroyar hava bundið seg til flestu mannarættindasáttmálarnar hjá ST og eru javnan til hoyringar um gongdina í hesum sambandi. Fjórða hvørt ár skipar ST fyri einari yvirskipaðari hoyring, *Universal Periodic Review,* har støðan í einstøku londunum verður eftirmett. Eitt av tilmælunum er, at Føroyar eiga at skipa eitt óheft eftirlit við mannarættindum. Landsstýrismaðurin setti tí ein arbeiðsbólk at koma við tilmæli um, hvussu ein føroysk mannarættindaeind ella ráð kann skipast. Tilmælið varð liðugt í mai mánað, og verður nú viðgjørt.

**Arktiska samstarvið**

Seinnu árini hevur landsstýrið raðfest luttøku í arktiska samstarvinum. Í ár luttók landsstýrismaðurin á ráðharrafundinum í Arktiska Ráðnum í Fairbanks, Alaska. Á fundinum undirritaðu landsstýrismaðurin og hinir uttanríkisráðharrarnir samstarvsavtalu um arktiska gransking. Áhugin fyri arktiska arbeiðinum er vaksandi í altjóðasamfelagnum, og fleiri lond og felagsskapir hava søkt um eygleiðarastøðu. Í Fairbanks fekk Útnorðurráðið góðkent umsókn um eygleiðarastøðu, ikki minst orsakað av dyggum stuðli frá føroyskari síðu. Á vári 2018 er ætlanin at skipa fyri eini arktiskari ráðstevnu í Havn í samstarvi við felagsskapin, ið stendur fyri árligu Arctic Circle ráðstevnuni í Íslandi.

**Menningar og neyðhjálp**

Sum partur av altjóða samfelagnum hava Føroyar skyldu at hjálpa neyðstøddum úti í heimi. Játtanin til menningarsamstarv og neyðhjálp hevur verið ov lág, tá ið sammett verður við, hvat onnur lond, sum vit samanlíkna okkum við, lata. Landsstýrið hevur tí fleirfaldað játtanina til neyðhjálp og menningarsamstarv. Føroyar kunnu nú betur enn nakrantíð virka fyri at tryggja sosial framstig og búskaparvøkstur í menningarlondum. Við hægri játtan kunnu vit veita teimum ringast støddu í heiminum munabetri hjálp, tá vanlukkur ella hungursneyð raka. Á teimum økjum, Føroyar hava áhugamál, hava Føroyar eisini vitan og førleikar – til dømis innan hav, fiskivinnu, alivinnu, umframt onnur øki. Tí fara vit frameftir at leggja størri dent á, at føroysk vitan og føroyskir førleikar meira miðvíst verða nýtt í okkara menningarsamstarvspolitikki

**Strategic Development Goals**

Menningarmálini hjá Sameindu Tjóðum fram ímóti 2030, eisini nevnd SDG (Strategic Development Goals), eru somuleiðis mál hjá Føroyum at stremba fram ímóti. Fleiri av hesum málum eru longu partur av føroyskum politiskum málsetningum, eitt nú innan menningarsamstarv, orkumenning og javnstøðu. Arbeitt verður saman við hinum norðurlondunum um hesi mál, og ein meiri samansjóðað føroysk ætlan viðvíkjandi menningarmálunum verður nú løgd til rættis.

## SAMFERÐSLU- OG ARBEIÐSMARKNAÐARMÁL

**Arbeiðsmarknaðarmál**

Landsstýrið hevur uppraðfest arbeiðsmarknaðarmál. Barsilsfarloyvið er longt úr 38 vikum í 44 vikur. Ætlanin er, at barsilsfarloyvið skal leingjast til eitt ár.

Eisini arbeiðsumhvørvið er raðfest. Játtanin til Arbeiðseftirlitið er økt til 6.239.000 kr. Í vár bleiv Arbeiðseftirlitið lagt saman við Brunaeftirliti. Hetta er nú sjálvstøðugur stovnur, sum eitur Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Høvuðsuppgávurnar hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eru støðugt at bøta um arbeiðsumhvørvið á øllum føroyskum arbeiðsplássum, umframt at virka fyri brunatrygd.

Arbeiðsloysið er tað lægsta síðan 2008, og Arbeiðsloysisskipanin hevur styrkt seg aftur eftir tey trongu árini 2010–2011 við nógvum arbeiðsloysi. Eginognin hevur verið í vøkstri og er nú uppi á 455.361.000 kr. Fyri at langtíðarhaldbarið hjá skipanini kann tryggjast, er neyðugt, at eginognin veksur, meðan arbeiðsloysið er lágt.

Vit liva í eini tíð, har menningin av tøkni tekur seg fram við rúkandi ferð. Hetta hevur við sær, at fleiri arbeiði verða automatiserað – serliga rutinukendu arbeiðini. Tí kann óttast fyri, at nógv fara at missa arbeiðið, serliga á fiskavirkjum, har tólmenni taka yvir, og í t.d. bankunum, har teldurnar taka yvir. Men søgan hevur víst, at automatisering ikki skapar arbeiðsloysi – tvørturímóti. Tørvurin á arbeiðsmegi verður bara ein annar enn áður. Tí er neyðugt, at tey, hvørs arbeiðsuppgávur verða automatiseraðar, kunnu umstilla seg, soleiðis at tey kunnu átaka sær aðrar uppgávur. At byrgja fyri, at hesi fólkini gerast arbeiðsleys og at tryggja øllum persónligar møguleikar til at arbeiða, verður virkað fyri at seta vaksnamannaútbúgvingar á stovn. Hetta hevur m.a. við sær, at tað verður smidligt hjá vaksnum at eftirútbúgva seg og fáa førleikamenning, uttan at tað skal taka ov langa tíð ella verða ein ov stór fíggjarlig avbjóðing. Í hesum sambandi er førleikameting neyðug, soleiðis at starvsroyndir í størri mun verða avgerandi fyri t.d. lønarstig og fyri at stytta vegin til eitt útbúgvingarprógv.

Ein týðandi táttur í hesi lívlongu læruni er lívlong vegleiðing. Lívlong vegleiðing minnir um vegleiðingina, sum fæst í fólka- og miðnámsskúlunum. Ítøkiliga ber hon í sær, at tey, ið av eini ella aðrari orsøk skulu skifta arbeiði, kunnu fáa vegleiðing um og íblástur til, hvat næsta stigið kann vera, soleiðis at tey kunnu koma víðari á yrkisleiðini.

Ein arbeiðsbólkur, ið er mannaður við limum úr teimum viðkomandi aðalráðunum, t.e. Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum, Samferðslumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, arbeiðir við at samskipa arbeiðið við lívlangari læru og lívlangari vegleiðing. Allir viðkomandi partar verða tiknir upp á ráð, og útfrá hesum verður avgjørt, hvussu vaksnamannaútbúgvingin ítøkiliga skal setast á stovn. Ætlandi verður álit um vaksnamannaútbúgvingar í Føroyum handað í heyst.

**At javnseta ferða- og flutningskostnað**

Í samgonguskjalinum er ásett, at ferða- og flutingskostnaður skal javnsetast. Samferðslumálaráðið hevur í eina tíð arbeitt við spurninginum, og ymiskir leistir verða viðgjørdir. Arbeiðið fer at halda fram, og ætlandi er úrslitið av greiningunum tøkt og uppskot til nýggjan leist lagt fram í komandi tingsetu.

**Vága- og Norðoyatunnilin**

Umrøða hevur staðist av undirsjóvartunlunum báðum, nú ið lánini eru um at vera afturgoldin. Nógv vilja vera við, at politiskt lyfti í síni tíð varð givið um, at nýtslugjaldið skuldi takast av, tá ið lánini vóru afturgoldin. Løgfrøðiliga tulkingin í undanfarna og núverandi landsstýri av verandi lógargrundarlagi hevur tó verið og er, at umframt lánið eigur eisini partapeningurin at verða goldin aftur.

Landsstýrismaðurin ætlar tó at fáa gjørt eina greiðari niðurstøðu um gjaldsskipanirnar í undirsjóvartunlunum, og í tí sambandi eiga fleiri týdningarmikil atlit at verða tikin: 1. Ein triði undirsjóvartunnil er í gerð, og ein fjórði fer í gongd seinni. 2. Tað er munandi dýrari at halda undirsjóvartunlar viðlíka enn í landtunlar, og somuleiðis eru ábøtur og dagføringar krevjandi. 3. Í arbeiðinum at javnseta ferða- og flutningskostnað tykist tað náttúrligt at taka undirsjóvartunlarnir við.

**Eystur- og Sandoyartunnilin**
Byrjað varð at bora Eysturoyartunnilin februar mánaði í ár. Borað verður Eysturoyar- og Streymoyarmegin samstundis. Arbeiðið gongur, sum tað skal, og eftir ætlan verður koyrandi í Eysturoyartunlinum í 2020. Tá ið liðugt er at bora Eysturoyartunnilin, verður farið at bora Sandoyartunnilin.

**Suðuroyartunnilin**
Peningur er settur av til at kanna grundarlagið fyri at fara í gongd við at leggja ætlanir um ein Suðuroyartunnil.

**Oyggjaleiðir**
Strandfaraskip landsins hava í fleiri ár víst á tørvin á einum eykaskipi, so tað verður léttari at handfara óhapp og óvæntaðar støður, umframt at nógv er at spara í viðlíkahaldi, tí dokkingarnar verða munandi léttari at leggja til rættis. Eisini fer at bera til at útvega eykainntøkur upp á ymiskar mátar. Borið saman við higartil fer SSL at hava eykaskipið tøkt allar 365 dagar í árinum. Sum er, er eykaskip tøkt 100 dagar árliga.

## ALMANNAMÁL

**Pensjónsnýskipanin**
Samgongan hevur sett sær fyri at tryggja øllum føroyingum eina góða pensjón nú og framyvir. Fyri at leggja búskaparligar lunnar undir vælferðarsamfelagið framyvir, er neyðugt at fremja eina varandi nýskipan av pensjónsøkinum í Føroyum. Nýggja pensjónsskipanin skal tryggja øllum eina góða pensjón, eggja pensjónistum at arbeiða og styrkja búskaparliga haldførið.

Arbeiðið við pensjónsnýskipanini er nú komið so mikið áleiðis, at lógaruppskotini verða løgd fyri Løgtingið tíðliga í heyst.

Pensjónsnýskipanin kemur at hava við sær broytingar í lógum og kunngerðum á økinum hjá bæði landsstýrismanninum í almannamálum og landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

**Tænastur til fólk, ið bera brek**
Sitandi samgonga hevur sett sær fyri, at nýskipanir skulu fremjast, sum tryggja øllum borgarum, ið bera brek, góða tænastu, rættartrygd og møguleikar at liva og virka í Føroyum.

Síðst í januar fekk landsstýriskvinnan við almannamálum handað tilmæli um Tænastupolitikk – við heitinum "Borgarin takast uppá ráð" umframt eina frágreiðing, sum lýsir tænastur, sum verða veittar í dag, hvørjar avbjóðingar eru bæði, tá ið hugsað verður um lóggávu, fíggjarkarm og tænastur. Tænastupolitikkurin stingur út í kortið, hvørjar meginreglur tænasturnar framyvir skulu byggja á, hvørjar tænastur skulu veitast, og hvussu hesar skulu skipast.

Fyrst í mai var aðalorðaskifti í Løgtinginum um tænastupolitikkin, og politikkurin fekk sera jaliga undirtøku frá øllum flokkum.

Almannamálaráðið er nú av álvara farið undir sjálvt lógarsmíðið, og landsstýriskvinnan við almannamálum ætlar at leggja nýggja lóggávu um almannahjálp, tænastur, rættartygd og tvingsil fyri Løgtingið í hesi tingsetu, sum kann fáa virknað 1. januar 2019.

**Samgongan raðfestir vardar bústaðir í Suðurstreymoy**

Samgongan hevur gjørt av at seta neyðug tiltøk í verk at bøta um bústaðarumstøðurnar hjá fólki við serligum tørvi, og hevur tí í tíðarskeiðnum 2017–2022 í hyggju at seta á leið 200 mió. kr. av á fíggjarlógini til átøk, sum fara at útvega fleiri og tíðarhóskandi vardar bústaðir í Suðurstreymoy.

Tað er avgerandi neyðugt, at vit nú raðfesta bústaðir og harvið virðilig kor til okkara veikastu borgarar, sum í so mong ár hava staðið í aftastu røð, tá um bústaðir ræður.

Átøkini tey næstu árini fevna um bústaðir til fólk við menningartarni, sálarsjúku, og seinheilaskaða, umframt at byggja nýggjan bú- og viðgerðarstovn til børn og ung við autismu og eitt nýtt barnaheim.

Nógv fólk standa í dag á bíðilista til vardan bústað. Við hesi ætlan verður mett, at bíðilistin til vardar bústaðir minkar munandi, umframt at tey gomlu sambýlini verða niðurløgd soleiðis, at tey, ið húsast í umbygdum sethúsum, fáa meira virðiligar bústaðir. Mett verður eisini, at fleiri borgarar við hesum fáa dagtilboð og umlætting.

**Sjálvboðið arbeiðið**

Føroyar hava langa siðvenju við sjálvbodnum arbeiði, og eru fleiri tænastur á almannaøkinum byrjaðar við sjálvbodnum arbeiði. Føroyska sivilsamfelagið er sum heild sera virkið. Í dag eru nógv ymisk áhugafeløg og sjálvbodnir felagsskapir, sum framvegis gera eitt stórt arbeiði, ið hevur stórt samfelagsligt virði. Nógvir sjálvbodnir felagsskapir eru partur av játtan og virkisøkinum almannamál.

Landsstýriskvinnan í Almannamálum ynskir at styrkja sjálvbodna arbeiðið á almannaøkinum, og hevur fyri stuttum fingið handað eitt tilmæli við átøkum, ið kunnu styrkja sjálvboðið arbeiði. Farið verður nú undir at viðgera og taka støðu til tilmælið við atliti at íverksetan.

**Íbúðarmál**

Hóast samgongan hevur útvegað 250 milliónir til Bústaðir, er tørvurin á bústøðum munandi størri enn stovnurin megnar at útvega. Í løtuni tykist tørvurin á bústøðum at veksa skjótari enn útboðið veksur. Tørvur er á at byggja munandi fleiri íbúðir innan stutta tíð, og hetta krevur, at fleiri lyfta uppgávuna og at lyft verður í felag. Arbeitt verður við at finna ein leist fyri hvussu útboðið á leiguíbúðum kann økjast og hvussu kommunur, vinna og íleggjarar kunnu hava ein leiklut í at útvega hóskandi bústaðir til øll.

At útvega fleiri og hóskandi bústaðir krevur samskipaði átøk, bæði í mun til at útvega nýggjar bústaðir og til tess at fáa fleiri av verandi bústøðum út á leigumarknaðin.

**Brekpolitikkur**
At veita fólki við breki javnbjóðis møguleikar og atkomu í samfelagnum yvirhøvur hevur høga raðfesting í samgonguni. Ein samskipandi eind verður nú skipað í landsfyrisitingini, ið hevur til endamáls at tryggja, at ásetingarnar í Breksáttmálanum verða framdar í verki innan øll viðkomandi øki. Uppgávur hjá samskipandi eindini er at tryggja ábyrgd og eigaraskap innan einstøku virkisøkini og at samskipanin millum myndugleikarnar verður so góð sum gjørligt.

Arbeiðið at orða ein brekpolitiska virkisætlan fyri Føroyar byrjar í næstum. Við einari brekpolitiskari virkisætlan verða ítøkiliga mál sett innan øll øki og týðandi rættindi, ið Breksáttmálin fevnir um. Málini verða sett yvir ávíst áramál, og hesi mál skulu kunna mátast, soleiðis at metast kann um í hvønn mun, málini verða rokkin.

**Viðgerðartilboð til ung við rúsevnatrupulleikum**
Talið á ungum fólkum við álvarsligum trupulleikum av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu hevur verið vaksandi seinastu árini. Higartil hevur ikki borið til hjá ungum undir 18 ár at fáa viðgerð fyri hesar trupulleikar í Føroyum, men seinni í ár fer Blákrossheimið at bjóða viðgerð til 15-18 ára gomul. Í hesum sambandi hevur landsstýriskvinnan við almannamálum tikið stig til at skipa eitt viðgerðartilboð til ung undir 18 ár við rúsdrekka- og rúsevnatrupulleikum, sum Almannaverkið varðar av. Endamálið er at veita hesum ungu eina samansetta viðgerð, ið eisini ber í sær viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu.

**Javnstøða**
Samgongan vil, at javnstøðupolitikkur skal raðfestast frammaliga, og hevur sett sær fyri at styrkja javnstøðupolitikkin. Arbeiðið at orða henda er farið í gongd, og til heystar verður aðalorðaskifti um javnstøðupolitikkin komandi árini.

**Harðskapur**
Arbeiðið sambært "Heildarætlan um kynsligan ágang" gongur væl.
Tilboðið um sálarfrøðiliga hjálp til teirra, sum hava seinárin orsakað av kynsligum ágangi í barnaárunum, varð boðið út í fjør. Hetta tilboð hevur fingið sera góða móttøku, og higartil hava á leið 40 fólk fingið hjálp frá sálarfrøðingi.

Sum eitt annað av átøkunum í Heildarætlanini um kynsligan ágang skipar Almannamálaráðið í september fyri einari norðurlendskari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum í Havn undir heitinum "Brót tabuið". Á breddanum eru kynslig rættindi hjá fólki, sum bera brek, og eisini kynsligur ágangur á fólk, sum bera brek.

Ráðstevnan verður skipað í samstarvi við Nordisk Velfærdscenter, og áhugin og undirtøkan eru stór í øllum Norðurlondum.

**Markamótsnevndin**
Sosialpolitiskt er yvirskipaða endamálið at beina markamótini millum land og kommunu av vegnum, og Markamótsnevndin er eitt amboð í so máta.

Markamótsnevndin er farin til verka, og higartil hevur hon viðgjørt 7 mál frá oktober 2016 til mars 2017. Avvarðandi myndugleikar hava tikið avgerðirnar hjá nevndini til eftirtektar.

Markamótsnevndin er ikki ætlað sum ein varandi loysn, og sjøtil er settur á eina tilgongd at býta endaligu ábyrgdina millum land og kommunu, soleiðis at markamótini gerast púra greið, og hvør myndugleiki átekur sær fulla ábyrgd fyri sínum leikluti.

Hvørji átøk eru framd:
Tænastupolitikkurin, ið er grundarlagið undir einari komandi tænastulóg, hevur verið til aðalorðaskiftis í Løgtinginum 2. mai 2017. Uppskot til tænastulóg verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

## HEILSU- OG INNLENDISMÁL

**Menning og samskipan av sjúkrahúsverkinum**
Í vár legði landsstýriskvinnan fram sínar framtíðarætlanir fyri føroyska sjúkrahúsverkið til aðalorðaskifti. Arbeitt verður við at skipa sjúkrahúsverkið sum ein organisatión – hetta merkir ítøkiliga, at tað í næstum verður settur ein ovasti leiðari fyri sjúkrahúsverkið, sum saman við lokalu staðbundnu leiðslunum kemur at mynda framtíðar leiðsluna í sjúkrahúsverkinum. Harnæst skal eitt greitt uppgávubýti verða millum fysisku eindirnar í organisatiónini. Ein felags visitatión og felags bíðilisti skal eisini skipast.

Eisini varð í vár nýggj heilsulóggáva samtykt, sum hevur til endamáls at bøta um sjúklingarættindi og sjúklingatrygd í Føroyum, umframt at bøta um góðskuna og eftirlitið við føroyska heilsuverkinum. Hetta verður m.a. gjørt við, at heilsustarvsfólk skulu fráboða ótilætlaðar hendingar í sjúkrahúsverkinum.

Á Suðuroyar sjúkrahúsi er framd munandi raðfesting av serlæknatilbúgvingini. Sostatt verður bjóðað tilboð um pínuviðgerð á Suðuroyar sjúkrahúsi í hesum árinum.

Átak er framt at fáa samskipað viðgerð uttanlands við viðgerð heima betur. Trupulleikin hevur serliga verið, at føroyingar í sjúkuviðgerð í Danmark, ikki sum aðrir útlendingar í Danmark, hava kunnað fingið administrativ cpr-nummur til samskiftið við danska heilsuverkið. Hetta er nú loyst.

**Menna heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum**
Samgongan hevur sett sær fyri, at allir føroyingar skulu kunna fáa eina góða heilsutænastu bæði nú og í framtíðini. Men ein fortreyt fyri at kunna fremja hetta í verki er, at vit fara undir at fremja neyðugar broytingar á heilsuøkinum. Landsstýriskvinnan er farin undir hetta arbeiðið, og hon hevur í hesum sambandi boðið øllum viðkomandi pørtum at luttaka í arbeiðinum.

Arbeitt verður við at gera eina skipan, har heilsutænastur í breiðari merking í munandi størri mun fara at vera at fáa í nærumhvørvinum hjá borgaranum. Ítøkiliga merkir hetta, at landið verður skipað í sterk

heilsuøkir við heilsudeplum, sum veita eitt fjølbroytt úrval av heilsutænastum. Landið fer at yvirtaka økið frá kommununum. Hesin parturin av heilsuverkinum verður reguleraður í fleiri ymsum lógin, og tí fer at verða orðað nýggj lóg, sum fevnir um hetta økið.

Henda umskipan fer at hava við sær, at hesin parturin av heilsuverkinum skal uppraðfestast munandi: Fleiri starvsfólk, eisini kommunulæknar, og eftirútbúgving av m.a. sjúkrarøktarfrøðingum. Vit hava júst sett tríggjar kommunulæknar í fast starv. Somuleiðis verður arbeitt við at økja um normeringina av kommunulæknum. Vit hava tørv á at útbúgva fleiri kommunulæknar. Skipanin hevur verið soleiðis, at tveir læknar árliga kundu fara undir kommunulæknaútbúgving í Føroyum. Í 2017 øktu vit játtanina til útbúgving; nú kunnu tríggir læknar fara undir serútbúgving í Føroyum til kommunulækna.

Á Klaksvíkar sjúkrahúsi verður í næstum farið undir at samvirka tilbúgvingina saman við kommunulæknavaktini á Landssjúkrahúsinum. Við hesum fer tørvurin hjá norðoyingum at koyra longri túrar fyri at koma til kommunulækna at minka munandi.

**Fleiri serútbúgvin heilsustarvsfólk**

Ein av stóru avbjóðingunum í sjúkrahúsverkinum er trotið á serlæknum og øðrum serútbúnum heilsustarvsfólkum. Serstøk játtan á 5 mió. krónur er sett av til at útvega fleiri serlæknar í 2017, og í játtanarkørmunum fyri 2018 er samtykt, at 5 mió. krónur aftrat skulu brúkast til endamálið í 2018. Ætlanin er, at henda serstaka játtanin skal hækka 5 mió. krónur á hvørjum ári komandi trý árini. Fleiri serlæknar og fleiri í føstum starvi fara at økja um tilboðini til sjúkuviðgerð og at hava størri støðufesti við sær til fyrimuns fyri sjúklingarnar og fyri læknarnar.

**Nýggjur meginbygningur til Landssjúkrahúsið**

Farið er nú undir at byggja nýggjan meginbygning til Landssjúkrahúsið. Talan er um eina av størstu verkætlanum á heilsuøkinum seinastu nógvu árini. Nýggi H-bygningurin skal hýsa nýggjum psykiatriskum depli við einastovum, nýggjari medisinskari seingjadeild við einastovum, nýggjari føði- og barsilsdeild við einastovum, nýggjari rehabiliteringseind og nýggjum køki, umframt goymslu og parkeringskjallara. Bygningurin verður hitaður við sjóhita. Flutt verður inn í bygningin í 2021.

**Sálarheilsa sett á breddan**

Samgongan raðfestir hjálpina til teirra, ið stríðast við sálarsjúku. Sálarlig heilsa er nú ein týðandi partur av virkisøkinum hjá Fólkaheilsuráðnum, og fleiri átøk eru gjørd at fremja sálarligu heilsuna hjá føroyingum. Nýggjur psykiatari er settur í fast starv á Landssjúkrahúsinum, og komið er á mest sum á mál við at skipa økispsykiatri um allar Føroyar, sum liður í at bjóða psykiatriska tænastu til fleiri fólk og nærri at borgarunum. Tvørfakligur arbeiðsbólkur er settur at gera heildarætlan fyri sálarliga heilsu. Málið er, at øll sálarsjúk skulu fáa eina javnbjóðis, dygdargóða og trygga viðgerð og tænastu, so tætt at gerandislívinum, sum til ber.

**Rúsdrekka- og rúsevnisøkið**
Í næstum verður aðalorðaskifti um Rúsdrekka- og rúsevnapolitikk Føroya. Millum mongu tættirnar í politikkinum er spurningurin um, hvussu vit tryggja dygdargóð viðgerðartilboð til tey – ung og vaksin, kvinnur og menn – sum hava viðgerð fyri neyðini. Í 2017 er peningur játtaður til tvey nýggj viðgerðartilboð til ung – til stovnin Frælsi á Eiði, sum bjóðar viðgerð til 18–25 gomul og til Blákrossheimið, sum fer at skipa eitt ambulant tilboð til 15–18 ára gomul í Tórshavn.

**Demensætlanin**
Fremsta raðfesting er at fáa sett landsdemenssamskiparar í starv, tí demensur er eitt vitanartungt øki. Nógvar av avbjóðingunum, sum økið hevur, kunnu handfarast við hollari vitan, sum verður miðlað til samfelagið sum heild og serliga til tey, sum kring landið hava uppgávuna at vera um fólk við demensi. Seinasta árið eru tveir samskiparar settir í starv á Landssjúkrahúsinum, og eftir ætlan skulu stigvíst fleiri demenssamskiparar setast. Hetta verður eitt øki, sum støðugt fokus verður sett á, til vit eru komin á mál við tilmælinum í demensætlanini.

**Etiskt ráð**
Í vár samtykti Løgtingið, at eitt Etiskt ráð veður sett 1. januar 2018. Etiska ráðið verður skipað við níggju limum, ið verða settir fyri fýra ár í senn. Endamálið við etiska ráðnum er at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, sum knýta seg til nýtsluna av bio- og ílegutøkni, sum hava ávirkan á lívið hjá menniskjum. Ráðið kann harumframt fremja og styrkja kjak um aðrar almennar og prinsipiellar etiskar spurningar, sum knýta seg til heilsufakliga virksemið á heilsu-, almanna- og kommunuøkinum. Ráðið virkar óheft og velur sjálvt tey evni og teir spurningar, sum ráðið tekur til viðgerðar innan lógarásettu karmarnar.

**Ferð á grøna orku**
Undir yvirskriftini "Ferð á grøna orku" hevur samgongan sett sær stór orkupolitisk mál. Millum málini er hetta, at í 2025 skal í minsta lagi helvtin av øllum sethúsum og bygningum hitast við grønari orku. Somuleiðis er málið, at í 2030 skal øll el-orka á landi koma frá varandi orku. Fyri at politiska skipanin skal hava bestu fortreytirnar at seta tey røttu átøkini í verk, verða møguleikarnir lýstir, og faklig tilmæli verða orðað um, hvat eigur at verða gjørt – og nær. Hetta arbeiðið verður handað í summar. Endamálið við verkætlanini er at framleiða ein orkupolitikk við tilmælum um ítøkilig átøk, ið eru neyðug at fremja fyri at røkka málunum á orkuøkinum, sum samgongan hevur sett út í kortið.

Fleiri átøk eru tó longu sett í verk á grønu kósini:

- Meirvirðisgjald á hitapumpum og uppseting verður endurrindað. Hetta hevur við sær, at hitapumpur verða upp til 30.000 kr. bíligari at útvega. Uppskotið er úrslit av góðum samstarvi millum tinglimir úr Tjóðveldi, Javnaðarflokkinum, Framsókn og Sjálvstýri.
- Fyri at tryggja brúkaran best møguligt hevur landsstýrið lagt fram uppskot um; at einans góðkendir installatørar kunnu seta upp hitapumpur. Ein uppgáva hjá góðkendum installatørum er eisini at veita ráðgeving, áðrenn avgjørt verður at útvega hitapumpu. Hetta varð samtykt í Tinginum í farnu viku.

- Eisini uppskotið hjá landsstýrinum um at el- og vetnisbilar verða frítiknir í meirvirðisgjaldi fyri upp til 70.000 krónur er samtykt.

Umframt hetta verður eftir ólavsøku uppskot til løgtingslóg klárt, ið leggur upp til, at el til hitapumpur og til elbilar verður bíligari. Arbeitt verður eisini við tilmælum til onnur ítøkilig uppskot um átøk at seta í verk til tess at røkka settu málunum.

**Veðurlagspolitikkur**

Føroyar eru partur av altjóða samfelagnum og vilja taka ábyrgd. Tí hava vit boðað donskum myndugleikum frá, at sonevndi París-sáttmálin eisini fær gildi fyri Føroyar. Tá Orkupolitikkur Føroya er orðaður, verður farið undir at dagføra okkara veðurlagspolitikk.

**Familjuræ ttarliga økið á føroyskar hendur**

Í vár samtykti Løgtingið at yvirtaka persóns-, húsfólka- og arvarætti. Yvirtøkan fær gildi á ólavsøku í 2018. Tað merkir, at framyvir verða tað føroyskir myndugleikar, sum hava lóggávuvald og útinnandi valdið á familjurættarliga økinum ein uppgáva, sum í dag liggur hjá donskum myndugleikum og verður útint hjá Ríkisumboðsmanninum. Familjurættarliga økið fevnir um reglur, sum røkka heilt inn í føroysku familjuna. Tað fyrsta, sum ætlanin er at fara í holt við eftir yvirtøkuna at dagføra løgtingslógina um foreldramyndugleika og samveru.

**Gera nýggja lóg um náttúruvernd**

Sjøtul er settur á arbeiðið at gera lóg um náttúruvernd. Yvirskipaða endamálið er at varðveita og verja margfeldið í náttúruni, samstundis sum pláss verður fyri at menna samfelagið. Lógin er ein neyðug fortreyt fyri, at skapa nútímans lógar- og fyrisitingarligar karmar um framtíðar náttúruvernd í landinum og gevur pørtum, áhugaðum, kommunustýrum o.ø. rætt at koma til orðanna í náttúruverndarmálum, áðrenn avgerðir verða tiknar. Við nýggju lógini er ætlanin at fara burtur frá gomlu skipanini, har náttúrufriðing í stóran mun bygdi á atlit at vakurleika og sjáldsemi, til nútímans náttúruvernd, sum í størri mun byggir á atlit at djóra- og plantusløgum á landi og sjógvi.

**Gera planlóg**

So skjótt náttúruverndarlógin er borin í Løgtingið, verður farið undir at gera planlóg fyri Føroyar. Endamálið við eini tílíkari lóg er at skipa og samskipa alla yvirskipaða planlegging í landinum.

**Ramsar-tilmæli**

Sum úrslit av arbeiðinum við Ramsar-tilnevndu oyggjunum, hava tvær kunngerðir verið til hoyringar. Tann fyrsta er ein dagførd og tíðarhóskandi kunngerð um fyribyrging og týning av rottu og reglur um sigling kring Nólsoy, Skúgvoy, Mykines og Mykineshólm.

**Luftdálking frá skipum**

Í løtuni er til hoyringar kunngerð um luftdálking frá skipum. Endamálið er at seta í verk annex VI til Marpol sáttmálan, sum millum annað snýr seg um luftdálking og um innihaldið av svávuli í olju.

**Krøv til sethúsaoljutangar**
Í løtuni er eisini til hoyringar uppskot til kunngerð um krøv til sethúsaoljutangar.

## UNDIRVÍSINGAR- OG MENTAMÁL

**Fólkaskúlin**
Landsstýriskvinnan við skúlamálum tók ta neyðugu avgerð herfyri at leggja landsroyndir fólkaskúlans á hillina eitt tíðarskeið, til greiða bæði er fingin á teimum mongu tøkniligu trupulleikunum og á námsfrøðiliga partinum eisini. Tí eitt er givið, vit skulu ikki órógva skúlarnar óneyðugt, og tað gera vit, tá ið vit ikki brúka úrslitini av landsroyndum og Pisa til at granska og menna skúlan.
At minka um óneyðuga skráseting og óneyðugt eftirlit verður ikki longur kravt at gera undirvísingargongdir í grunddeildini.

Førleikastovurnar eru mentar við tímum og fakligari ráðgeving í støddfrøði.

Játtanin til orðblindalærarar er hækkað, so teir hava sama tímatal sum lesivegleiðarar.

Støddfrøðivegleiðarar og lestrarvegleiðarar verða lidnir við hollar eftirútbúgvingar í summar. Skúlarnir fáa tímar til støddfrøðivegleiðing, og avtalan um niðurskurð til skúlavegleiðing verður tikin upp til nýggja viðgerð.

Tað er skúlaleiðslan, sum skal ganga á odda at menna einstaka skúlan. Tí hevur landsstýriskvinnan stovnað serstaka føroyska skúlaleiðaraútbúgving á diplomstøði, sum fer av bakkastokki í summar. Talan er um spennandi samstarv millum Námsvísindadeildina og Diplomútbúgvingina á Glasi, og áhugin hevur verið serstakliga stórur at fara undir hesa útbúgving. Eitt satt skúlamenningartiltak, sum heilt vist fer at síggjast aftur úti í skúlanum, við tað at leiðslurnar gerast meira professionellar.

Í næstum verða eftirútbúgvingar skipaðar fyri KT-vørðar, skúlabókavørðar og AKT lærarar. Eisini verður skipað fyri skeiði í lívbjarging fyri allar lærarar, sum undirvísa í svimjing. Harumframt verður arbeitt við at skipa eina náttúruvegleiðaraútbúgving.

Við støði í kanningum frá 2007 og 2015 hava vit sett fleiri tiltøk í verk at styrkja trivnaðin og basa happingini í skúlunum. Skúlarnir arbeiða í løtuni miðvíst við evninum við støði í teimum átøkum, sum hava verið seinastu tíðina, og Mentamálaráðið ger meginreglur um trivnaðararbeiðið í fólkaskúlanum. Eisini er ætlanin at útvega trivnaðarkanningar, sum skúlarnir kunnu brúka innanhýsis.

Til tess at styrkja um førleikarnar at skilja og luttaka í fólkaræðisliga samfelagnum hevur landsstýriskvinnan sett í verk royndarskipan við samfelagsfrøði sum lærugrein frá 7. flokki til 9. flokk. Byrjað verður eftir summarfrítíðina við 7. flokki, har dentur er lagdur á demokratisku luttøkuna. Námsætlan er orðað. Nám hevur framleitt tilfar, og lærarar hava verið á skeiði í at brúka tilfarið.

Samgongan setti sær eisini sum mál, at *"skúlarnir kring landið verða skipaðir í hóskiligar samstarvseindir."* Sjøtul er settur á hetta arbeiðið, sum verður viðgjørt breitt politiskt í einum fylgibólki, í fyrstu atløgu viðvíkjandi at skipa 10. flokseindir kring landið.

**Serligur tørvur**
Meginreglan skal vera, at børn skulu ikki ferðast longur enn ein hálvan tíma til sernámsfrøðiligt skúlatilboð. Serstovur eru tí settar á stovn í Suðuroynni, Havn, Vágum, Eysturoynni og Norðoyggjum, so til ber at gagnnýta stuðulstímarnar betur, og børnini fáa sostatt eitt skikkað skúlatilboð, har fakfólk eru um tey.

Serligt skipað miðnám er ein sólskinssøga, og er nú tilboð á Glasi, á Kambsdali og í tekniska skúla í Havn og í Klaksvík. Tað sama við autismuflokkinum í Hoydølum, har ein flokkur verður tikin upp aftur í ár. Á Rásini eru fyrstu næmingarnir lidnir, sum hava verið undir tí nýggju skipanini við 2 ára skúlagongd.

Eisini er játtanin hækkað til sálarfrøðitænastur á miðnámi, tí alt fleiri ung hava sálarligar trupulleikar. Hetta er ein ovurstórur trupulleiki, sum vit eiga at taka í størsta álvara.

**Miðnám**
Á miðnámi verður í løtuni arbeitt við at eftirmeta breytaskipanina og yrkisútbúgvingarskipanina, sum nú hava virkað í nøkur ár.

Í fjør settu vit á stovn FHS í miðnámsskúlanum í Suðuroy, og í summar verður eisini búskaparbreyt bjóðað út har suðuri.

Risastóra byggingin í Marknagili, Glasir, hevur sum kunnugt havt stórar avbjóðingar. Arbeiðið gongur væl og flutt verður í nýggja skúlan komandi summar.

**Hægri lestur**
Setrið fór undir tríggjar nýggjar útbúgvingar í fjør: Búskaparfrøði, hjánám í støddfrøði og fólkaheilsa, umframt fleiri pláss til sjúkrarøktarfrøði.

Á vinnuháskúlanum er aspirantskipanin víðkað til eisini at fevna um maskinmeistarar. Higartil hevur tilboðið einans fevnt um navigatørar, harav teir fyrstu verða lidnir sum skipsførarar um 1½ ár. Fyrstu maskinmeistararnir byrja eftir ætlan nú í summar. Eisini verður arbeitt við at skipa ein bachelor-yvirbygnað til maskinmeistara- og skipsføraraútbúgvingarnar í samstarvi millum Vinnuháskúlan og Fróðskaparsetrið, og væntandi verður hetta útbúgvingartilboð klárt um ½ til 1 ár.

**Livandi og lokkandi lestrarumhvørvi**
Tað var hugaligt at seta orðið *kampus* í samgonguskjalið, so vit kunnu fáa eitt líkinda lestrarumhvørvi við lestrartilboðum, íbúðum og øðrum tilboðum. Hóast búskaparstøðan ikki loyvir okkum at byggja tað stóra og glasiliga Fróðskaparsetrið, sum vit kundu hugsað okkum, so fegnast vit um, at virksemið á Setrin-

um verður savnað úti við Frælsið og oman í Sjóvinnuhúsið. Við hesi loysn nøkta vit bráðfeingis og ovurhonds stóra hølistørvin á Setrinum, men ásanna eisini, at Setrið veksur, og at skjótt verður tørvur á fleiri fermetrum. Ein framtíðarætlan fyri setursøkið (kampus) verður tí løgd í næstum.

**Lestrarstuðul**

Útbúgvingarpolitikkurin fevnir eisini um lestrarstuðul, sum vit hava sett okkum fyri at bøta munandi um, so okkara skipan er kappingarfør við ta donsku, ið vit sum kunnugt kappast við. Í summar hækkaði lestrarstuðulin við 500 kr. fyri hægri lestur, umframt 12. mánað til stakar uppihaldarar. Næsta stigið verður, at øll lesandi á hægri útbúgvingum skulu fáa lestrarstuðul allar 12 mánaðirnar árliga.

**Akademi og diplom**

25 nýggj lesandi hava fingið pláss á yrkisakademiútbúgving í fíggjarbúskapi á Glasi (hægri útbúgvingar), og ætlandi verður diplomútbúgving í innovatión og íverksetan bjóðað út komandi ár.

**Lestrarvegleiðing**

Vit arbeiða í løtuni við at seta á stovn betri skipaða lestrarvegleiðing, bæði til børn, ung og vaksin. Ikki minst er umráðandi at byggja brúgv millum fólkaskúla og miðnám og at leggja størri dent á vegleiðing um lívlanga yrkisleið. Í summar verður ein flokkur á Setrinum liðugur við útbúgving í lestrarvegleiðing, og skulu hesi nú út í skúlaverkið at virka. Umframt hetta hevur Mentamálaráðið raðfest at seta fólk í starv at arbeiða við førleikameting burturav.

**Gransking**

Mentamálaráðið hevur tikið stig til at endurskoða skipanina við stuðli til gransking. Málið er, at alt granskingarøkið verður samskipað í størri mun, og at lógarverkið verður tillagað í hesum sambandi. Hetta verður gjørt til at gagnnýta tilfeingið og førleikarnar innan samlaða granskingarøkið uppaftur meira skynsamt. Granskingargrunnurin er raðfestur við einari millión, umframt at partur av tilfeingisgjaldinum í ár fer til fiskivinnuroyndir.

**Útbúgvingar út um landið**

Sum sagt hevur samgongan sett sær fyri at skapa útbúgvingarmøguleikar kring alt landið. Tí hava vit eisini raðfest at stuðla teimum ætlanum, sum liggja í kortunum viðvíkjandi húsarhaldsskúla í Klaksvík, eftirskúla í norðara parti av Suðuroy, ítróttarháskúla í Vági og at bjóða út ferðavinnuútbúgving í Vestmanna. Harumframt liggur í kortunum at fara undir 3. byggistig í miðnámsskúlanum á Kambsdali. Eisini er ætlanin at kanna møguleikan fyri at seta á stovn útbúgving til náttúruvegleiðarar, sum bæði dagstovnar, skúlar og ferðavinnan kunnu fáa stórt gagn av.

Tað var eitt stórt framstig, at aldursmarkið til háskúlar varð lækkað til eisini at fevna um ung, sum eru liðug við 9. flokk. Við røttu tilboðunum kann hetta lokka hópin av ungum at velja eitt føroyskt háskúlatilboð í staðin fyri at fara av landinum.

**Arbeiðsmarknaðardepil, vaksnamannaútbúgving og lívlong læring**
Sitandi samgonga hevur sett sær fyri at fyrireika vaksnamannaútbúgvingar.

Arbeiðið at fyrireika vaksnamannaútbúgvingar varð sett í verk á sumri í 2016. Settur er arbeiðsbólkur við umboðum úr Mentamálaráðnum, Samferðslumálaráðnum, Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum. Afturat sær hevur arbeiðsbólkurin umboð fyri arbeiðsmarknaðin, vinnuna og fakfeløg.
Endamálið við arbeiðinum er at gera uppskot til eitt 3-partasamstarv, um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil, ið skal gera tað lættari hjá vaksnum ófaklærdum at fara undir eina útbúgving, og at seta í verk skipaða førleikameting, førleikamenning og lívlanga vegleiðing.

**Mentanargrunnurin**
Umstøðurnar hjá føroyskum listafólkum skulu bøtast. Játtanin til Mentanargrunnin skal upp í 10 mió. kr. í samgonguskeiðinum. Hetta er nærum ein tvífaldan. Í heyst fáa vit skipan fyri yrkislistafólk undir Mentanargrunninum, har hesi kunnu søkja um arbeiðsnáðir í longri tíðarskeið – eitt slag av minstulønarskipan.

**Søvnini**
Á mentanarøkinum eru eisini søvnini, okkara bygdasøvn, fornminnissøvn, bókasøvn, skjalasøvn og listasøvn. Aftaná eina heldur baldruta tilgongd eru Søvn Landsins býtt sundur aftur, nú í tríggjar stovnar, Tjóðsavn Føroya, Landsskjalasavnið og Landsbókasavnið. Uppgávan verður nú at fáa til vega neyðuga lógargrundarlagið, hølisumstøður og játtan, so vit røkja okkara savnsøki á haldgóðan hátt.

**Tjóðpallur**
Í heyst verður ferð sett á tilgongdina at fáa Føroyum ein virðiligan Tjóðpall, har leiklistin og harvið føroyska listamálið veruliga kann blóma. Í løgukarminum hava vit sett 60 mió. kr. av, og í næstum verður farið undir samráðingar við allar viðkomandi partar um verkætlanina – ikki minst tann fíggjarliga partin, har hugsast kann, at bæði kommunur, vinnurekandi og møguliga eisini útlendingar vilja vera við. Ætlandi verður verklagslóg um Tjóðpallin løgd fyri Løgtingið seinni í ár.

**Málmenning**
Tað er av alstórum týdningi, at børn hava eitt ríkt og fjølbroytt mál, so tey kunnu samskifta, seta orð á og skifta orð um heimin, sum tey eru partur av, og soleiðis styrkja teirra persónligu, sálarligu, kognitivu og sosialu menning, og ger tey før fyri at luttaka virkið í demokratiska orðaskiftinum.

Arbeitt verður í løtuni við einum átaki um málsliga menning hjá børnum í dagstovnaaldri, sum skal setast á breddan komandi ár, bæði við ítøkiligum tiltøkum og kunningarátaki um týdningin av málsligari menning hjá børnum.

**Ítróttur**
Landsstýriskvinnan í mentamálum hevur boðað frá, at Føroyar sjálvsagt skulu bjóða seg fram at vera vertur fyri Oyggjaleikirnar í 2023.

**Miðlar**

Tað var ein stórur sigur fyri fólkaræði, at føroyska miðlalandslagið nú er vorðið sterkari og støðugari, enn tá samgongan tók við. Vit hava eitt rættvísari kringvarpsgjald, og Kringvarpið fekk støðugari fíggingargrundarlag og er vorðið óheft av lýsingum. Í heyst fáa privatir miðlar miðlastuðul eins og í øllum øðrum framkomnum demokratiskum samfeløgum.

**Kirkjan**

Á kirkjuøkinum verður árið í ár hátíðarhildið sum Lutherár. Hesum fara vit at taka lut í saman við fólkakirkjuni, sum eisini kann hátíðarhalda, at nú á ólavsøku eru 10 ár liðin, síðan fólkakirkjan varð yvirtikin.

# LØGLISTI

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til Stjórnarskipan Føroya**
Við uppskotinum verður ein tillagaður § 25 nevndartekstur til Stjórnarskipan Føroya lagdur fyri Løgtingið.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini kap. 25–29. (II/2017)**
Kapitlarnir verða dagførdir og týddir til føroyskt. Hesir kapitlar fevna um hesi brotsverk: Kapittul 25: Brot móti lívi og likami. Kapittul 26: Brot móti persónliga frælsinum. Kapittul 27: At valda ónáðir og ærumeiðing (Freds- og ærekrænkelser). Kapittul 28: Fíggjarbrotsverk. Kapittul 29: Serligar ásetingar viðvíkjandi løgfrøðiligum persónum.

## FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**
Ásettir verða fiskidagar frá 1. sept. – 31. des. 2017.

**Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**
Uppskotið um fyrisiting av sjófeingi er eitt nýtt grundarlag undir fiskivinnupolitikki, fiskivinnufyrisiting og kørmunum hjá vinnurekandi til atgongd at fiska og vinna burtur úr sjófeinginum, ið føroyska tjóðin eigur og hevur ræði á. Uppskotið verður lagt fram av nýggjum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bygging av nýggjum havrannsóknarskipi**
Talan er um økta játtan. Uppskotið verður lagt fram av nýggjum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving**
Lógin verður endurskoðað og dagførd.

**Frágreiðing um tilbúgving til aðalorðaskiftis**
Frágreiðingin lýsir, hvussu tilbúgvingin í síni heild er skipað. Landsstýrismaðurin skal leggja fram fyri Løgtingið frágreiðing um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, herundir um broytingar mugu verða gjørdar í lógini.

**Uppskot til løgtingslóg um tilfeingisavgjøld**
Serstøk løgtingslóg verður gjørd um tilfeingisgjøld av veiðirættindum innan fiskiveiðu.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Fíggjarmál*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um landsins játtanarskipan**
Sum liður í eini eftirmeting av játtanarskipanini verða ymsar dagføringar og broytingar gjørdar.

**Uppskot til fíggjarlóg 2018**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini leggur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum fyri 1. oktober á hvørjum ári fyri Løgtingið uppskot um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.

**Uppskot til játtanarkarmar 2019–2023**
Sambært játtanarskipan landsins leggur landsstýriskvinnan í fíggjarmálum fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina komandi árið og yvirskipaðar játtanarkarmar fimm ár fram.

*Búskapargrunnur og Landsbanki Føroya*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya**
Dagføra lógarásetingar viðvíkjandi inngjaldi og útgjaldi til tess at røkka einum sjálvbjargnum búskapi, samhaldsfesti millum ættarlið og búskaparligum støðufesti.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð**
Dagføringar av ymsum lógarásetingum.

*Pensjónsnýskipan*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**
Dagføringar í sambandi við pensjónsnýskipan, herundir dagføring av inngjaldi og dagføring av, hvør hevur rætt til at fáa útgjald v.m.

**Uppskot til løgtingslóg um eftirløn**
Dagføringar í sambandi við pensjónsnýskipan.

*Skattur*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (ásetingarlógin)**
Dagføring av ásetingum um skatt av fyritíðarpensjón og av ásetingum um barnafrádráttin, so hann gerst meira tíðarhóskandi, og at foreldur í størri mun skulu kunna býta frádráttin sínámillum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Strika skattaafturbering til bare-boat leigað skip uttan fyri FAS)**
Reiðarí eiga ikki longur at fáa endurgoldnan tann skatt, ið er goldin av manningum við skipum, sum reiðaríini hava leigað uttan manning (bare-boat leigað), men ikki skrásett í føroysku skipaskránni FAS. Lógaruppskotið fall burtur í farnu tingsetu. Fíggjarnevndin hevði skrivað álit í málunum – sí tingmál 137/2016.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Tagnarskyldan og upplýsingarskylda dagførast)**
Herda tagnarskyldan í § 151 í Skattalógini varð ásett, langt áðrenn vit fingu vanligar innlitsreglur og fyrisitingarlóg. Tíðin er komin til at endurskoða hesa áseting. Eisini verður upplýsingarskyldan hjá vinnurekandi feløgum endurskoðað.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt**
Dagføringar og fylgibroytingar í sambandi við fiskivinnunýskipan, um "transfer pricing" og skatt av tilfeingisrentu.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi (kapitalvinningsskattalógin)**
Dagføring av lógini.

**Uppskot til løgtingslóg um at skifta linkingarhátt í norðurlendsku dupultskattaavtaluni frá eksemptión til kreditt**
Broyting av linkingarhátti í sambandi við norðurlendsku skattaavtaluna soleiðis, at farið verður frá eksemptións- til kredittlinking.

*Tollur og avgjøld*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald**
Dagføring, ið gevur tollvaldinum heimild til at fáa atgongd til ferðafólkalistar fyri at styrkja eftirlitið við rúsevnasmugling, umframt dagføring av lógini um frímerki og myntir v.m.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skásetingargjald á motorakførum**
Dagføring av skrásetingargjaldinum soleiðis, at tað í størri mun verður grundað á útlát.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tollsatsir (toll- og vøruskráin)**
Árliga dagføringin av vørunumrum og møgulig broyting í áseting av tollsatsum.

**Uppskot til løgtingslóg um skráseting av útflutningi**
Dagføring av lógini við atliti at talgildari fráboðan v.m.

*Fíggjarstovnar*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya realkreditstovn (Realin)**
Dagføring av lógini, herundir dagføring av ásetingum um eftirlit við Realinum.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om finansiel virksomhed"**
Dagføring av bankalóggávuni, herundir nýggjar ásetingar um, at bankar skulu hava egna bjargingarloysn, um bankar fara á húsagang.

Umframt hesa dagføring av lóggávuni, verður "lov om finansiel virksomhed" eisini broytt soleiðis, at staðfest verður, at Føroya váðaráð og Landsbanki Føroya kunnu fáa upplýsingar beinleiðis frá føroysku peningastovnunum.

*Varskógvaraskipan*

**Uppskot til løgtingslóg um varskógvaraskipan fyri almenn starvsfólk**
Nýggj lóg, sum tryggjar almennum starvsfólkum møguleikan at boða frá óreglusemi um varskógvaraskipan.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um aling av fiski v.m.**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at tryggja, at alivinnan ikki verður enn meira miðsavnað, og at tað samstundis verða skaptir lógarkarmar fyri, at alivinnan innan fyri burðardyggar karmar, herundir lívfrøðiliga burðardygd, fær betri møguleikar fyri menning og vøkstri við nýggjari framleiðslutøkni. T.d. aling á landi ella á meira harðbalnum sjóøkjum (off shore) og aling av skeljadjórum og tara. Broytta endamálsorðingin í uppskotinum um atlit at lívfrøðiligari burðardygd, og reglurnar í uppskotinum um m.a. eigaramark, alifirðir og útlendskan kapital broyta alilógina soleiðis, at alilógin betur stuðlar undir nevndu endamál.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin)**
Endamálið við uppskotinum er at seta reglurnar í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini um landspartafeløg í gildi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
Endamálið við lógaruppskotinum er at áseta nýggjar reglur um tryggingarhaldfelagsskapir og at dagføra meginreglur um leiðslu og solvens.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kongligari fyriskipan um ígildissetan fyri Føroyar av "lov om visse erhvervsdrivende virksomheder" (vinnufyritøkulógin)**
Lógaruppskotið fevnir um fyrrverandi fíggarfyritøkur sbrt. § 1 a í vinnufyritøkulógini, har rakstrarfeløgini hjá fyritøkuni reka bæði tryggingar- og bankavirksemi. Endamálið við uppskotinum er at minka um váðan fyri tryggingarpartin í móðurfelagnum, um ein bankakreppa aftur skuldi tikið seg upp í Føroyum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin)**
Endamálið við uppskotinum er at áseta reglur, sum skulu forða fyri, at partafeløg verða nýtt sum skattaskjól. Nýggju reglurnar í uppskotinum skulu tryggja, at almennnir myndugleikar skulu kunna fáa upplýsingar um, hvør er kapitaleigari í felagnum og um veruligar eigarar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kongligari fyriskipan um ígildissetan fyri Føroyar av "lov om visse erhvervsdrivende virksomheder" (vinnufyritøkulógin)**
Endamálið við uppskotinum er samsvarandi endamálinum við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin). Nýggju reglurnar í uppskotinum skulu tryggja, at almennir myndugleikar skulu kunna fáa upplýsingar um, hvør er eigari í felagnum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kongaligari fyriskipan um ígildissetan fyri Føroyar av "lov om erhvervsdrivende fonde" (lógin um vinnurekandi grunnar)**
Endamálið við uppskotinum er samsvarandi endamálinum í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í vinnufelagalógini. Ásettar verða reglur, sum skulu tryggja almennum myndugleikum upplýsingar um, hvør hevur eigaralíknandi heimildir í grunninum, t.d. upplýsingar um nevndarlimir og um, hvør fær útlutanir úr grunninum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
Endamálið við uppskotinum er samsvarandi endamálinum við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í vinnufelagalógini. Nýggju reglurnar í uppskotinum skulu tryggja, at almennir myndugleikar skulu kunnu fáa upplýsingar um, hvør er kapitaleigari í tryggingarfelagnum og um veruligar eigarar.

**Uppskot til løgtingslóg um bókhald (bókhaldslógin)**
Uppskotið kemur í staðin fyri galdandi løgtingslóg um bókhaldsskyldu frá 1978 og kunngerð um minstukrøv til bókhald og roknskap frá 1993, soleiðis at reglurnar í mestan mun verða savnaðar á einum stað. Uppskotið hevur til endamáls at seta nýggjar og tíðarhóskandi reglur fyri bókhald og bókhaldsvirksemi annars.

**Uppskot til løgtingslóg um djóravælferð**
Uppskotið avloysir galdandi løgtingslóg um vernd av dýrum frá 1985. Uppskotið hevur til endamáls at dagføra reglurnar um djórahald og djóravernd.

**Uppskot til løgtingslóg um mynstring ella uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um mynstring**
Endamálið við uppskotinum er at nútímansgera lógina soleiðis, at samsvar verður millum lógina og broyttar mannagongdir á økinum m.a. í sambandi við, at elektroniskar skipanir eru tiknar í nýtslu.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um uppmáling av skipum**
Ásetingar í løgtingslóg um uppmáling av skipum, sum kom í gildi í 1957, eru ikki tíðarhóskandi m.a. reglurnar um gjald fyri uppmáling. Uppskotið hevur til endamáls at seta nýggjar og tíðarhóskandi reglur í gildi.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skráseting av skipum**
Endamálið við uppskotinum er at gera fylgibroyting orsakað av broytingum í fiskivinnulóggávuni.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um P/F Visit Faroe Islands**
Visit Faroe Islands skal umskipast soleiðis, at felagið nú eisini skal hava uppgávuna at menna ferðavinnuna í Føroyum. Ein menningardeild verður sett á stovn á VFI, og endamál felagsins verður frameftir tvíbýtt. Eisini skulu galdandi stuðulsskipanir í ferðavinnuni endurskoðast.
Lógin um P/F Visit Faroe Islands skal broytast soleiðis, at hon samsvarar við tann bygnað, sum ætlanin er at seta á stovn.

**Uppskot til løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum**
Endamálið við uppskotinum er at menna føroyska filmsvinnu við at seta í verk eina afturberingarskipan, ið eggjar útlendskum filmsframleiðarum at koma til Føroyar at taka filmar upp. Sambært lógaruppskotinum eru tað bert útreiðslur, sum eru rindaðar í Føroyum, og sum kunnu dragast frá sambært løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, ið eru grundarlag undir útrokning av afturberingini.

**Frágreiðing fyri Løgtingið um politikk fyri skapandi vinnur**
Í januar mánaði 2014 samtykti Løgtingið at heita á landsstýrið um at fyrireika og leggja frágreiðing fyri Løgtingið um politikk fyri skapandi vinnur.

**Frágreiðing fyri Løgtingið um eigarapolitikk og um uppskot um at seta reglurnar um landspartafeløg í vinnufelagalógini og ársroknskaparlógini í gildi**
Løgtingið samtykti á vári 2015 uppskot til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at heita á landsstýrið um at leggja frágreiðing fyri Løgtingið um virkiseindir, sum ikki eru við í fíggjarlóg, men sum landið eigur ella á líknandi hátt luttekur í, og at seta í verk átøk og fyriskipanir, sum skulu tryggja, at áhugamálini hjá virkiseindunum verða røkt á forsvarligan hátt. Frágreiðing verður nú løgd fyri Løgtingið um eigarapolitikk landsins, t.e., hvussu landið eigur at útinna eigaraleiklutin í partafeløgum og øðrum líknandi vinnufeløgum, sum landið eigur.

**Frágreiðing fyri løgtingið um ferðavinnupolitikk**
Í mai 2017 varð heildarætlanin "Ferðavinna í Føroyum" handað landsstýrismanninum í UVMR. Heildarætlanin inniheldur fleiri tilmæli um, hvørji átøk eiga at verða framd, soleiðis at vit røkka málinum um eina væl skipaða og bruðardygga ferðavinnu.

**Uppskot til løgtingslóg um matstovur**
Endamálið við uppskotinum er at áseta nýggjar og endurskoðaðar reglur, ið gera tað einfaldari at søkja um loyvi til matstovuvinnu, eins og tað verður einfaldari at umsita og hava eftirlit við vinnuni. Hildið verður, at hetta endamál best verður rokkið við at gera eina lóg, sum samlað ásetur yvirskipaðu reglurnar fyri matstovuvinnuna.

## SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
Endamálið við uppskotinum er at gera tað lættari at fáa atgongd til akfarsskránna, tó við atliti til verju av persónupplýsingum.

**Uppskot til løgtingslóg um tunnil millum Trongisvág og Hvalba (Hvalbiartunnulin)**
Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýrismanninum materiella heimild at gera neyðugar avtalur o.a. í sambandi við bygging av tunnili millum Trongisvág og Hvalba (Hvalbiartunnulin).

**Uppskot til løgtingslóg um innkomuveg til Tórshavn**
Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýrismanninum materiella heimild til at gera neyðugar avtalur o.a. í sambandi við ger av innkomuvegi til Tórshavn.

**Uppskot til løgtingslóg um um keyp av avloysaraskipi til Strandfaraskip Landsins**
Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýrismanninum materiella heimild at gera sáttmála um keyp av avloysaraskipi til Strandfaraskip Landsins.

**Uppskot til løgtingslóg um havnir**
Endamálið við uppskotinum er at gera eina nýggja havnarlóg, sum skal koma í staðin fyri galdandi lóg um havnir, sum er frá 1913.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at áseta í lógina galdandi siðvenju um, at upphæddir undir 2500 kr. ikki verða kravdar inn.

## ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um tænastur, almannahjálp, rættartrygd og tvingsil**
Endamálið við uppskotinum er at tryggja rættindini hjá borgarum, sum bera brek.
Reglurnar skulu áseta innihaldið í teimum tænastum umframt almannahjálp, sum Almannaverkið, sjálvsognarstovnar og sjálvbodnir felagsskapir kunnu bjóða borgarum og geva myndugleikunum greiðari karmar at virka undir.

Reglurnar skulu veita einstaka borgaranum trygd fyri, at tvingsilsinntriv ikki verða nýtt uttan greiða lógarheimild, og at tvingsil einans verður nýttur sum síðsti útvegur. Lóggávan skal harafturat áseta, hvørji tvingsilsinntriv eru lóglig, og nær og hvussu tey kunnu verða sett í verk.

**Pensjónsnýskipan**
Endamálið við uppskotinum er at tryggja øllum føroyingum eina góða pensjón, eggja fólki til at arbeiða eftir pensjónsaldur og at styrkja búskaparliga haldførið. Talan er um hesar broytingar:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a.
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg (forsorgarlógin)

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu**
Endamálið við lógini er at geva landsstýriskvinnuni heimild til at fara undir at byggja eitt bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu. Talan er um eina búeind við 6 búplássum, eina umlættingareind við 6 plássum og eitt dagtilboð til áleið 16 børn og ung.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja sambýli til fólk við menningartarni**
Endamálið við lógini er at geva landsstýriskvinnuni heimild at fara undir at byggja sambýli í Tórshavn til fólk við menningartarni. Talan er um 2 sambýli við áleið 30 búplássum.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja barnaheim**
Endamálið við lógini er at geva landsstýriskvinnuni heimild at fara undir at byggja nýtt barnaheim í Tórshavn. Ætlanin er, at nýggja barnaheimið skal hava áleið 25 búpláss, umframt familjueind, útslúsing og eftirvernd.

**Uppskot til til løgtingslóg um at byggja bústaðir til fólk við seinheilaskaða**
Endamálið við lógini er at geva landsstýriskvinnuni heimild at fara undir at byggja bústaðir til fólk við seinheilaskaða. Talan verður um eina búeind við áleið 10 búplássum, umframt umlættingareind og møguligt dagtilhald.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útleigan av bústøðum**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at leingja uppsagnarfreistina fyri útleigarar. Tá leigulógin varð smíðað, var einki alment bústaðafelag. Lógin tekur bert støði í privata leigumarknaðinum. Tillagingar verða tí gjørdar, ið leggja upp fyri almenna bústaðafelagnum, eitt nú í mun til at góðkenna uppsøgn av leigumáli.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening**
Endamálið við uppskotinum er at tryggja hóskandi samsvar millum arbeiðsskaðalógina og dagpeningalógina soleiðis, at ávísir starvsbólkar ikki detta niðurímillum.

**Frágreiðing um javnstøðupolitikk til aðalorðaskiftis**
Frágreiðing um javnstøðupolitikkin verður løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskifti í oktober.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.**
Eftir umbøn frá Kommunufelagnum er ætlanin at broyta lógina, tí tørvur er á at fáa greiðar og rættvísar reglur fyri, hvør ber kostnaðin í sambandi við, at røktarkrevjandi borgarar flyta kommunu.

## HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um orkupolitikk**
Endamálið við einum politikki á økinum er at áseta, hvørji politisk átøk afturat teimum, sum longu eru sett í verk í hesum árinum, skulu verða sett í verk til tess at røkka orkupolitiska málinum í samgonguskjalinum.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya**
Endamálið við einum politikki á økinum er at fyribyrgja og tálma nýtsluni av rúsdrekka og rúsevnum. At menna og víðka viðgerðartilboðini til misnýtarar og avvarðandi og at minka um medisinsku og sosialu skaðaárinini av misnýtslu. Ætlanini er at fáa sett í verk ítøkilig átøk, sum skulu verða framd árini 2017–2020.

**Uppskot til løgtingslóg um viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu**
Sum ein liður í strembanini eftir støðugt at betra viðgerðartilboðini til teirra, ið hava tørv á viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, verður lóg sett í gildi, har ásetingar verða um krøv til viðgerðarstøð; krøv um fakligar førleikar og fakliga menning hjá starvsfólkum á viðgerðarstøðum, skipan, rakstur o.s.fr.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (ávísing uttanlands)**
Í desember 2014 vórðu framdar týðandi broytingar í skipanini av "Serviðgerð uttanlands" við at fíggjarliga ábyrgdin av játtanini til serviðgerð uttanlands og heimtøkur varð býtt út til sjúkrahúsini. Broytingarnar hava havt við sær, at uppgávurnar hjá Visitasjónsnevndini eftir broytingarnar nú eru

avmarkaðar til at gera og dagføra leiðreglur umframt at viðgera ítøkilig visitasjónsmál. Tí verður ikki mett, at tað er grundarlag undir einari Visitajónsnevnd, sum landsstýrismaðurin skal seta sum lið millum stjórnarráðið og sjúkrahúsini. Tí er endamálið við broytingini, at tær avmarkaðu uppgávurnar, ið enn liggja eftir hjá nevndini, eisini verða fluttar til sjúkrahúsini at umsita.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gransking í mannaílegum**
Ílegulógin kom í gildi í 2005 og varð dagførd í 2008. Nú lógin hevur verið í gildi í 12 ár, er tørvur á at dagføra lógina. Ein arbeiðsbólkur varð í 2013 settur at útgreina lóggávuna á humangenomøkinum í Føroyum og handaði sítt álit í 2015. Í hesum sambandi gjøgnumgekk arbeiðsbólkurin ílegulógina, og hevði hann nøkur ítøkilig tilmæli til, hvørjar broytingar eiga at verða gjørdar í lógini. Tað er av stórum týdningi, at fleiri av hesum broytingunum vera framdar fyri m.a. at tryggja og verja einstaklingin í sambandi við genomgransking.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet"**
Síðani lógin varð sett í gildi í Føroyum, eru fleiri broytingar framdar í Danmark. Virkisøkið er víðkað soleiðis, at borgarar í Føroyum ikki hava somu rættindi sum í Danmark. Eisini er Patientombudet niðurlagt í Danmark. Tí er tørvur á at fáa lógina dagførda.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om anvendelse af tvang ved somatisk behandling af varigt inhabile (tvangsbehandlingsloven)"**
Nú hava vit "lov om anvendelse af tvang i psykiatrien", sum bert ásetir krøv um nýtslu av tvingsli í psykiatriini. Við at seta í gildi "lov om anvendelse af tvang ved somatisk behandling af varigt inhabile" verða reglur ásettar, ið gera tað møguligt hjá starvsfólki at nýta tvingsil í teimum pørtum av sjúkrahúsverkinum, sum ikki fevna um psykiatriska viðgerð (somatiska partinum). Lógin fevnir bert um sjúklingar yvir 15 ár, sum varandi hava mist førleikan at kunna geva samtykki til viðgerð.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om ændring af lov om tvang i psykiatrien"**
Endamálið við lógarbroytingini er at geva heimild at seta í gildi fyri Føroyar nakrar neyðugar kunngerðir, sum eru settar í gildi í Danmark. Talan er m.a. um ásetingar um fráboðan og kæruvegleiðing í sambandi við nýtslu av tvingsli.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**
Endamálið við uppskotinum er at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum um fyribyrgjandi heilsukanningar, sum verður veitt teimum við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar. Tað verður gjørt við, at heilsufrøðingar fáa heimild til at gera nevndu kanning. Kommunulæknar varðveita sína heimild at gera hesar kanningar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunulæknaskipan og uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**
Endamálið við uppskotunum er ein liður í arbeiðinum at nútíðargera kommunulæknaskipanina. Ætlanin er at broyta uppgávubýtið ímillum land og kommunur soleiðis, at landið yvirtekur skyldurnar hjá kommununum og verður frameftir einasti ábyrgdarhavari í kommunulæknaskipanini. Eisini er neyðugt at seta inn ásetingar um heilsuøki og heilsudeplar. Neyðugt er at broyta løgtingslóg um kommunulæknaskipan og løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung.

**Uppskot til ríkislógatilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om stedbestemt information"**
Endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi lóggávu á kortøkinum fyri at at fáa leysgivið donsk kortdata viðvíkjandi Føroyum. Samstundis er hetta partur av tilgongdini at yvirtaka málsøkið kort- og landmátingarmyndugleiki.

**Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd**
Endamálið við uppskotinum er at skipa miðvísa føroyska náttúruvernd. Við fakligari náttúrufyrisiting og miðvísari náttúruskráseting verður miðað eftir at verja og varðveita ta føroysku náttúruna við hennara lívfrøðiliga margfeldi, lívøkjum, vistskipanum, djóra- og plantulívi, landsløgum, jarðfrøði, mentanarminnum o.ø. núlivandi og komandi ættarliðum at gagni.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um dagføring av veðurlagspolitikki Føroya**
Endamálið við einum dagførdum politikki á økinum er at gera tey mál, vit hava sett fyri Føroyar, ítøkilig. Føroyar hava tikið undir við, at París-sáttmálin fær gildi fyri Føroyar og hava heitt á Danmark í síni fráboðan til ST at gera vart við, at Føroyar seta síni egnu mál eftir tí leisti, sum semja var um í 2009.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um elveiting (elveitingarlógini)**
Endamálið við uppskotinum er at fáa heimild í elveitingarlógini at differentiera elprísir til hitapumpur og til bilar soleiðis, at tað er við til at skunda undir orkuskiftið frá olju til el.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin)**
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva landsstýrismanninum somu heimild at seta tiltøk í verk ímóti kommunalum samstørvum, sum eru ásett í lóggávu. § 51 í kommunustýrislógini fevnir um *"kommunusamstørv, ið hava við sær avmarkingar í teimum lógarásettu heimildunum, sum kommunustýrið hevur eftir hesi lóg"*. Sambært viðmerkingunum til greinina fevnir greinin einans um avtalur um samstarv millum kommunur. Kommunalt samstarv, ið er beinleiðis ásett í aðrari lóggávu, er ikki fevnt av § 51.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingslóg um musealt virksemi**
Nýggj lóg um virksemið hjá Tjóðsavni Føroya v.m., sum kemur í staðin fyri lógirnar um Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn.

**Løgtingslóg um barnaváttanir**
Nýggj lóg, har heimilað verður løgregluni at skriva út barnaváttanir, og heimilað verður stovnum og feløgum at krevja barnaváttanir.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya landsskjalasavn**
Viðvíkjandi varðveiting av talgildum savnindum og ymsar dagføringar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
Ymsar dagføringar og møguligar bygnaðarligar broytingar, sum hava gildi frá august 2018.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
Ymsar dagføringar, herímillum kæruatgeingi í kommunalum starvsfólkamálum og skipan av dagstovnaráði.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frískúlar**
Viðvíkjandi greiðari skipan fyri játtan og umsiting av stuðli til fríkúlar og gjald fyri forskúlar hjá fríkúlum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**
Broytingin snýr seg serliga um stuðulsveitingar til hægri lestur í Føroyum. Fylgilóg í sambandi við fíggjarlógina fyri 2018.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp**
Tillagingar og dagføringar av kringvarpslógini, sum hevur havt gildi í meiri enn tvey ár. Gildi frá 1. januar 2018.

**Uppskot til løgtingslóg um gransking**
Bygnaður og vav innan granskingarvirksemið.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja skúladepil í Tórshavn**
Uppskotið snýr seg upphæddir og gildið í lógini.

**Aðalorðaskifti um fólkaskúlan**
Viðgerð av málum og virkseminum hjá fólkaskúlanum.

**Aðalorðaskifti um Málráðið**
Eftirmeting av virkseminum sambært §10, stk. 3 í Løgtingslóg nr. 59 frá 15. mai 2012 um málráð.

# HAGTØL

**Mynd 1:** Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985 til 2017 ..... 66
**Mynd 2:** Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2016 ..... 66
**Mynd 3:** Fólk flutt til og úr Føroyum, januar 2007 til mai 2017 ..... 66
**Mynd 4:** Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan. 1996 til mai 2017 ..... 67
**Mynd 5:** Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), januar 1985 til mai 2017 ..... 67
**Mynd 6:** Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 til juni 2017 ..... 67
**Mynd 7:** Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998–2015 ..... 68
**Mynd 8:** Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 til 2. ársfj. 2017. Indeks 1. ársfj. 2001 = 100 ..... 68
**Mynd 9:** Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2017 ..... 68
**Mynd 10:** Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2017 ..... 69
**Mynd 11:** Laksur og síl tikin skift á ár og slag, 1996 til 2016 ..... 69
**Mynd 12:** Innflutningur og útflutningur, 1988 til 2016 ..... 69
**Mynd 13:** Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan. 1998 til juni 2017 ..... 70
**Mynd 14:** Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans, 1998–2015 ..... 70
**Mynd 15:** Úrslit landskassans, 1997 til 2017 ..... 70
**Mynd 16:** Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar) í % av BTÚ, 1998 til 2013 ..... 71
**Mynd 17:** Lands- og kommunuskattur, fyribilsskattur, mió. kr., 1985 til 2015 ..... 71
**Mynd 18:** Skattainntøkur tess almenna, 1998 til 2013 ..... 71
**Mynd 19:** Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi og í % av BTÚ, 1997 til 2015 ..... 72
**Mynd 20:** Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá kommununum, 1998 til 2013 ..... 72
**Mynd 21:** Brutto- og nettoskuld hjá kommununum og kommunuskattur, 1993 til 2013 ..... 72
**Mynd 22:** Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, januar 2006 til juni 2017 ..... 73
**Mynd 23:** Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 til juni 2017 ..... 73
**Mynd 24:** Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 til juni 2017 ..... 73
**Mynd 25:** Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 til juni 2017 ..... 74
**Mynd 26:** Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 til juni 2017 ..... 74
**Mynd: 27:** Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 til juni 2017 ..... 74

## Mynd 1: Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985 til 2017




Kelda: Hagstovan.

## Mynd 2: Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2016




Kelda: Hagstovan.

## Mynd 3: Fólk flutt til og úr Føroyum, januar 2007 til mai 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 4: Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan. 1996 til mai 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 5: Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), januar 1985 til mai 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 6: Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 til juni 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 7: Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2015




* Tølini fyri 2015 eru fyrsta útgáva.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 8: Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 til 2. ársfj. 2017. Indeks 1. ársfj. 2001 = 100




Kelda: Hagstovan.

Mynd 9: Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 10: Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 11: Laksur og síl tikin skift á ár og slag, 1996 til 2016




Kelda: Hagstovan.

Mynd 12: Innflutningur og útflutningur, 1988 til 2016




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 13: Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan. 1998 til juni 2017




Kelda: Hagstovan.

Mynd 14: Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans, 1998-2015




Kelda: Hagstovan og Fíggjarmálaráðið.

Mynd 15: Úrslit landskassans, 1997 til 2017




Viðm.: Tølini fram til og við 2016 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2017 eru fíggjarlógartøl.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 16: Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar) í % av BTÚ, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Mynd 17: Lands- og kommunuskattur, fyribilsskattur, mió. kr., 1985 til 2015




Kelda: Hagstovan.

Mynd 18: Skattainntøkur tess almenna, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Mynd 19: Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi og í % av BTÚ, 1997 til 2015




Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 20: Inntøkur, útreiðslur og úrslit hjá kommununum, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Mynd 21: Brutto- og nettoskuld hjá kommununum og kommunuskattur, 1993 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Mynd 22: Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, januar 2006 til juni 2017




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 23: Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 til juni 2017




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 24: Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 til juni 2017




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 25: Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 til juni 2017




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 26: Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 til juni 2017




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Mynd: 27: Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 til juni 2017




Kelda: Fíggjarmálaráðið.